tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Býráðið

Dagfesting: 01.10.2026 kl. 17:00
Málnr.:

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, ~~Arnfinn Bech~~

Varalimir: Jens Rói Sørensen

Ikki møtt: Arnfinn Bech

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

Málsyvirlit		
Til støðutakan		
65/26	26/00262-3	Fíggjarætlan 2027
66/26	26/00181-1	Geopark
67/26	25/00458-2	Tvøroyrar skúli - dagføring av skúlagørðum
68/26	25/00119-1	Eldradepil & íbúðarbygging á Ryggi í Trongisvági
69/26	26/00297-3	Kirkjugarðurin undir Akurgerði - Ætlanir fyri víðkan 2026
70/26	25/00026-1	TB Tvøroyrar Bóltfelag -ynskið um fótbóltshøll við Stórá
71/26	26/00321-3	Uppskot til broyting av byggisamtyktini - neystaøki (2026)
72/26	26/00322-2	Uppskot til broyting av byggisamtyktiini - Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding (2026)
73/26	26/00323-2	Uppskot til broyting av byggisamtyktini - Havnarøkið og Vinnuøki (2026)
Til kunningar		
16/26	26/00001-1	Kunning um skattainntøkur 2026
17/26	25/00212-2	GIGNI -áheitan um at fáa skipanina við heilsufrøðingi í Tvøroyrar skula at virka samsv. áseting.
18/26	26/00073-2	BHS -uppskot til strategi

19/26	26/00324-2	Barnatannrøktin støðulýsing um avloysarastarvið í barnatannrøktini – 14. september 2026

Kunning til býráðið
Kristin Michelsen, borgarstjóri, setur fundin og kunnar um, at Anfinn Bech hevur fráboðað, at honum berst frá at møta til býráðsfundin í dag, 1. oktober 2026, og at hann hevur heitt á Jens Róa Sørensen, ið er fyrsti (1.) valdi varalimur á lista F, til kommunustýrisvalið 12. november 2024, um at møta í staðin. Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar. Jens Rói Sørensen hevur havt sæti í býráðnum framundan og tekur tí sæti uttan atkvøðugreiðslu.

Skrá og viðmerkingar til hesa:
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Ongin viðmerking til skránna.

Til støðutakan

65/26
26/00262-3 Fíggjarætlan 2027

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	23.09.2026	87/26
2 Býráðið	01.10.2026	65/26

Málslýsing: Kommunustjórin – 15. september 2026

Sambært kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin í seinasta lagi 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Við hesum verður fyrsta uppskotið til fíggjarkarm og arbeiðsgongd fyri **fíggjarætlan Tvøroyrar kommunu fyri 2027** lagt fyri Fíggjarnevndina og býráðið.

Endamálið við hesi fyrstu viðgerðini er at leggja teir yvirskipaðu fíggjarligu karmarnar fyri arbeiðið, herundir fyribils inntøkumetingar, og at skapa eitt grundarlag fyri víðari politiska viðgerð av skattaprosenti, barnafrádrátti, rakstri og íløgum.

Lýsing av málinum

Arbeiðið við fíggjarætlanini fyri 2027 er byrjað. Stovnar, deildir, nevndir og býráðslimir hava fingið høvi at lata inn uppskot og ynski til rakstur og íløgur fyri komandi fíggjarár.

Uppskotini verða savnað og skipað sum grundarlag undir víðari politisku viðgerðini. Endalig støða til rakstrarjáttanir og íløgur verður tikin av býráðnum sum partur av samlaðu fíggjarætlanini.

Sum útgangsstøði verður mælt til, at vanligar rakstrarútreiðslur einans verða hækkaðar, um talan er um:

- lógarbundnar ella sáttmálabundnar broytingar,
- politiskt samtyktar virksemisbroytingar,
- avleiðingar av nýggjum íløgum ella nýggjum virksemi,
- lønar- og prísvøkstur,
- ella onnur neyðug og væl grundað rakstrarviðurskifti.

Í endaligu fíggjarætlanini fyri 2026 varð raksturin settur til umleið **95,8 mió. kr.**, meðan íløgurnar vórðu settar til umleið **38,6 mió. kr.** Kommunuskattaprosentið varð ásett til **20,9 %**, og barnafrádrátturin varð ásettur til **10.000 kr.**

Fyribils inntøkumeting fyri 2027

TAKS hevur latið kommununi eina fyribils uppgerð fyri skattaárið 2027. Sambært uppgerðini er **kommunala skattagrundarlagið 383.984.724 kr.**, og barnatalið er **361**. Uppgerðin er gjørd persón fyri persón og vísir m.a. A-inntøku, B-inntøku, frádráttir, FAS-inntøku og kommunalt skattagrundarlag.

Við verandi kommunuskattaprosenti á **20,9 %** svarar hetta skattagrundarlag til eina brutto kommunuskattainntøku á umleið:

80,25 mió. kr.

Við verandi barnafrádrátti á **10.000 kr.** verður samlaði barnafrádrátturin:

361 × 10.000 kr. = 3,61 mió. kr.

Fyribils mett nettoskattainntøka verður sostatt umleið:

76,64 mió. kr.

Til samanberingar varð í fyrstu metingini fyri fíggjarætlan 2026 roknað við skattainntøkum á umleið **73,0 mió. kr.**, grundað á eitt kommunalt skattagrundarlag á umleið **363,6 mió. kr.**

Fyribils TAKS-uppgerðin fyri 2027 vísir sostatt eitt skattagrundarlag, sum er umleið **20,4 mió. kr. hægri** enn grundarlagið, sum varð lagt til grund fyri fyrstu fíggjarætlanarmetingina fyri 2026.

Metingin er fyribils og eigur at verða dagført, um nýggjari upplýsingar frá TAKS, Gjaldstovuni ella øðrum viðkomandi keldum fyriliggja áðrenn endaligu viðgerðina av fíggjarætlanini.

Skattaprosent og barnafrádráttur

Kommunuskattaprosentið fyri 2026 er **20,9 %**, og barnafrádrátturin er **10.000 kr.**

Í hesum fyrsta stigi verður ikki mælt til broytingar í skattaprosenti ella barnafrádrátti. Umsitingin leggur heldur fram fíggjarligu avleiðingarnar av møguligum broytingum, soleiðis at Fíggjarnevndin og býráðið hava eitt greitt grundarlag at taka politiska støðu út frá.

Við einum skattagrundarlagi á **383.984.724 kr.** svarar ein broyting á **1 prosentstig í kommunuskattinum** til umleið:

3,84 mió. kr. í árligari skattainntøku.

Tað merkir t.d., at ein lækking úr **20,9 % niður í 19,9 %** hevði minkað kommunalu skattainntøkuna við umleið **3,84 mió. kr**.

Við 361 børnum svarar ein hækking av barnafrádráttinum við **1.000 kr.** til umleið **361.000 kr.** í minni árligari skattainntøku. Ein hækking úr **10.000 kr. í 15.000 kr.** hevði sostatt kostað umleið **1,805 mió. kr.** árliga.

Endaliga støðan til skattaprosent og barnafrádrátt verður tikin av býráðnum sum partur av víðari viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2027.

Fyribils fortreytir fyri rakstur

Í arbeiðinum við rakstrinum fyri 2027 verður fyribils roknað við, at lønarútreiðslurnar skulu dagførast samsvarandi galdandi og væntaðum sáttmálabroytingum. Somuleiðis verður neyðugt at taka hædd fyri prísvøkstri og øðrum kostnaðarhækkingum, har hesar hava veruliga ávirkan á kommunala raksturin.

Rakstrarjáttanirnar verða annars dagførdar við støði í:

- verandi rakstri,
- sáttmála- og lønarbroytingum,
- lógarbundnum útreiðslum,
- býráðssamtyktum,
- virksemisbroytingum,
- og rakstrarligum avleiðingum av nýggjum íløgum.

Rakstur og íløgur

Rakstrar- og íløguynski fyri 2027 verða savnað frá deildum, stovnum, nevndum og býráðslimum.

Talan er í hesum fyrsta stigi ikki um endaliga støðutakan til einstakar játtanir, men um at fáa eitt samlað yvirlit yvir ynski og tørv, soleiðis at býráðið kann raðfesta innan fyri ein realistiskan fíggjarkarm.

Serligur dentur eigur at leggjast á:

- verandi rakstrarskyldur,
- lógar- og sáttmálabundnar útreiðslur,
- framhaldandi og áður samtyktar íløgur,
- nýggjar neyðugar íløgur,
- og hvussu samlaða íløguætlanin ávirkar gjaldføri, lántøku og framtíðar rakstur.

Skuld og fíggjarligt rásarúm

Í málinum um fíggjarætlan 2026 varð víst á, at nettoskuldin við árslok 2024 svaraði til umleið **34 % av einari álíkning**, og at kommunan tá hevði eitt munandi láns-rásarúm. Kommunan hevði samstundis upptikið lán á **15 mió. kr.** í 2025.

Í sambandi við fíggjarætlan 2027 eigur nýggj uppgerð at verða gjørd av:

- nettoskuld,
- álíkning,
- gjaldføri,
- verandi lánum og avdráttum,
- og møguligum nýggjum lántørvi.

Hesi viðurskifti eiga at vera partur av grundarlagnum, áðrenn endalig støða verður tikin til íløguætlanina fyri 2027.

Viðgerðarætlan

Mælt verður til, at arbeiðið við fíggjarætlan 2027 verður skipað soleiðis:

September 2026:
Fíggjarnevndin og býráðið taka fyribils fíggjarligu fortreytirnar og inntøkumetingarnar til viðgerðar og leggja karmarnar fyri víðari arbeiðið.

September–oktober 2026:
Nevndir, deildir og stovnar viðgera og lata inn uppskot til rakstur og íløgur. Umsitingin savnar, greinar og kostnaðarmetir innkomnu uppskotini.

Oktober 2026:
Býráðið hevur felags fíggjarætlanarviðgerð/arbeiðsdag, har rakstur, íløgur, inntøkur, skattaprosent, barnafrádráttur, gjaldføri og fígging verða gjøgnumgingin og raðfest.

Í seinasta lagi 1. desember 2026:
Endalig fíggjarætlan fyri 2027 verður viðgjørd og samtykt samsvarandi kommunustýrislógini.

Lógargrundarlag

Sambært § 39 í kommunustýrislógini er fíggjarárið frá 1. januar til 31. desember.

Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Sama lógargrundarlag varð nýtt í málsviðgerðini av fíggjarætlan 2026.

Fíggjarligar avleiðingar

Fíggjarætlanin fyri 2027 verður grundarlagið undir rakstri, íløgum, fígging og gjaldføri hjá Tvøroyrar kommunu í 2027.

Fyribils TAKS-uppgerðin gevur við verandi skattaprosenti og barnafrádrátti eina metta nettoskattainntøku á umleið **76,6 mió. kr.**

Aðrar inntøkur, eitt nú partafelagsskattur, gjøld, endurgjøld og aðrar kommunalar inntøkur, verða lagdar afturat í samlaðu fíggjarætlanini, tá dagførdar metingar fyriliggja.

Endaliga fíggjarliga rásarúmið kann tí ikki staðfestast, fyrr enn:

- endaligar inntøkumetingar fyriliggja,
- rakstrarjáttanirnar eru dagførdar,
- íløguynskini eru raðfest,
- og ávirkanin á RLÚ, gjaldføri, skuld og álíkning er roknað.

Tilmæli

Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla Fíggjarnevndini til at mæla býráðnum til:

1. at taka fyribils TAKS-uppgerðina fyri 2027 og fíggjarligu fortreytirnar til eftirtektar,
2. at leggja til grund fyri víðari arbeiðið, at kommunala skattagrundarlagið fyribils er **383.984.724 kr.** og barnatalið **361**,
3. at taka til eftirtektar, at hetta við verandi skattaprosenti á 20,9 % og barnafrádrátti á 10.000 kr. gevur eina fyribils metta nettoskattainntøku á umleið **76,6 mió. kr.**,
4. at taka til eftirtektar, at ein broyting á **1 prosentstig í kommunuskattinum** svarar til umleið **3,84 mió. kr.** í árligari skattainntøku,

5. at taka til eftirtektar, at ein hækking av barnafrádráttinum við **1.000 kr.** svarar til umleið **361.000 kr.** í minni árligari skattainntøku,
6. at endalig støða til skattaprosent og barnafrádrátt verður tikin av býráðnum til endaligu støðutakan til víðari fíggjarætlanarviðgerðini,
7. at rakstrar- og íløguynski frá nevndum, stovnum, deildum og býráðslimum verða savnað og greinað sum grundarlag undir víðari arbeiðinum,
8. og at endaligt uppskot til fíggjarætlan 2027 verður lagt fyri býráðið til lógarásettu viðgerðirnar og endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2026.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:

Borgarstjórin mælir til, at Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til, í sambandi við 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2027, at samtykkja:

- at **skattaprosentið verður *(20,9%)* óbroytt í mun til 2025**, og
- at **barnafrádrátturin verður *(kr. 10.000,-)* óbroyttur í mun til 2025**.

Somuleiðis mælir borgarstjórin til, at býráðslimir saman við leiðarum og øðrum viðkomandi starvsfólkum úr umsitingini hittast til arbeiðsfundir um fíggjarætlanina fyri 2027 í døgunum **11.–13. november 2026**.

Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið.

Býráðið 01. oktober 2026:

Borgarstjórin mælir til, at býráðið í sambandi við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2027 tekur fyribils metingina hjá TAKS av skattagrundarlagi og barnatali til eftirtektar og við hesum sum grundarlagi tekur undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini frá 23. september 2026, har mælt verður til, at skattaprosentið fyri 2027 við fyrstu viðgerð av fíggjarætlan fyri 2027 verður sett til 20,9 % og barnafrádrátturin til kr. 10.000,-, bæði óbroytt í mun til FÆ2026.
Somuleiðis verður mælt til, at býráðslimir, leiðarar og viðkomandi starvsfólk úr umsitingini hittast til arbeiðsfundir 11.–13. november 2026, har rakstur og íløgur verða viðgjørd, og at onnur viðgerð og endalig samtykt av FÆ2027 fer fram á býráðsfundinum í november 2026.

Einmælt samtykt.

66/26
26/00181-1 Geopark

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	27.04.2026	62/26
2 Býráðið	05.05.2026	10/26
3 Fíggjarnevndin	23.09.2026	91/26
4 Býráðið	01.10.2026	66/26

Málslýsing: Kommunustjórin 23.04.2025
Ólavur Rasmussen, stjóri í SALT hevur -saman við Jarðfeingið- tikið stig til uppskot um at skipa Suðuroynna sum Geoparkøkið. Allir borgarstjórar í Suðuroynni vóru bodnir á fundi í SALT mánadagin 20. Apríl har greitt var frá ætlanini. Avtala/kunna bleiv um á fundinum ein ætlan um at vitja Geoparkina Det Sydfynske Øhav, sum bleiv til veruleika í juni 2023.

Geopark:
Ein geopark er eitt landafrøðiligt øki, har serstakt jarðfrøðiligt skap hevur avgerandi týdning fyri lívið í økinum. Endamálið við Geoparkum er at skapa eina sterka felags samleika sum grundarlag fyri lokalari menning við virðing fyri bæði landslagi, mentanararv og villu náttúruna.

Det Sydfynske Øhav
Økið kring Suðurfynska Oyggjahavið er heilt serstakt, og her finnast nógv støð og øki við bæði tjóðskaparligum og altjóða jarðfrøðiligum virði.

Tí samdust tær fýra suðurfynsku kommunurnar (Faaborg-Midtfyn, Langeland, Svendborg og Ærø) í 2018 um at samstarva fyri at verða viðurkendar sum UNESCO Global Geopark.

Kommunurnar upplýsa at samstarvið um Geopark Suðurfynska Oyggjahavið gevur eina røð av fyrimunum og møguleikum, og lýsing av økinum er:

Vitan
Ein geopark er meira enn jarðfrøði. Endamálið er at kanna, menna og miðla samanhangin millum jarðfrøðiliga arv økisins, náttúruna og mentanarsøguna. Sambandið millum jørðina og menniskjað er í miðdeplinum fyri at styrkja tilvitskuna um, at lív okkara er fullkomiliga samantvinnað við jørðina, landslagið, náttúruna og mentanina, sum vit eru ein partur av.

Samanhald
Ein geopark styrkir lokalsamfelagið við at stuðla undir samstarv og felagsskapir millum lokal og økis aktørar. Hetta fevnir til dømis um jarðeigarar, lokalar matframleiðarar, ferðavinnu- og kunningarstovur, skúlar og granskingarumhvørvi. Felags málið er at gera serligu virðini í økinum sjónlig og at binda økið saman í eina felags frásøgn um landslagið, náttúruna og mentanararvin.

Menning
Fyri at verða góðkendur sum ein UNESCO Global Geopark skal geoparkin hava eina menningarætlan og hava virkað sum geopark í nøkur ár. Geoparkir skapa tí ein felags karm um menningina í økinum við denti á, at bæði menniskju og náttúra trívast og mennast á burðardyggan hátt.

Profilering
UNESCO er eitt altjóða kent brand, og ein viðurkenning sum UNESCO Global Geopark fer at styrkja frásøgnina um Suðurfynska Oyggjahavið sum eitt heilt serligt øki – bæði at búgva í og at vitja sum ferðafólk. Ein geopark verður góðkend fyri fýra ár í senn, og tí verður ein strategi og handlingsætlan gjørd fjórða hvørt ár.

Tilmælið:
Mælt verður Tvøroyrar býráði til at samtykkja, at Tvøroyrar kommuna luttekur í ætlanini og verður partur av arbeiðinum við at skipa Suðuroynna sum eina geopark, og at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við fyriliggjandi ætlan.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at Tvøroyrar kommuna luttekur í ætlanini at skipa Suðuroynna sum eina geopark, og at umboð hjá Tvøroyrar kommuni vitja Geopark í Fyn, saman við Jarðfeingið og øllum kommunum í Suðuroynni.

Býráðið 05. mai 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Kommunustjórin 14.09.2026: Ískoyti til málslýsing
Geopark Suðuroy – framhaldandi fyrireikingararbeiði
Víst verður til fyriliggjandi mál um Geopark Suðuroy, sum varð viðgjørt í fíggjarnevndini 27. apríl 2026 og í býráðnum 5. mai 2026.

Fíggjarnevndin mælti einmælt til, at Tvøroyrar kommuna skuldi luttaka í ætlanini at skipa Suðuroynna sum geopark, og at umboð fyri kommununa skuldu vitja UNESCO Global Geopark Det Sydfynske Øhav saman við Jarðfeingi og hinum kommununum í Suðuroy. Í býráðnum varð málið umrøtt og kunnað.

Tann 20. mai 2026 vitjaðu umboð fyri kommunurnar í Suðuroy, SALT, Jarðfeingi, Tjóðsavnið, føroysku UNESCO-nevndina og Visit Faroe Islands UNESCO Global Geopark Det Sydfynske Øhav. Endamálið var at fáa vitan og íblástur til, hvussu ein geopark kann skipast og mennast í samstarvi millum kommunur, myndugleikar, vinnulív og lokalsamfeløg.

Á felags fundi í SALT 22. juni 2026 varð nærri kunnað um Geopark Suðuroy, møguleikarnar fyri oynna og treytirnar fyri seinni at kunna søkja um góðkenning sum UNESCO Global Geopark.
Ein UNESCO Global Geopark skal hava eitt greitt avmarkað øki, jarðfrøðilig virði av altjóða týdningi og eina virkna og fíggjarliga burðardygga umsiting. Harumframt krevst breið lokal luttøka og samstarv millum kommunur, feløg, vinnulív, skúlar, granskingarumhvørvi og borgarar.

Jarðfrøðiligu virðini eru grundarlagið, men endamálið fevnir eisini um náttúru, mentan, søgu, útbúgving, gransking, miðling, ferðavinnu og burðardygga vinnuliga menning. Ein geopark er ikki ein friðing, men ein felags menningarleistur, har staðbundnu virðini verða varðveitt, miðlað og nýtt á ein burðardyggan hátt.

Jarðfeingi hevur mælt kommununum til at taka undir við, at arbeiðið við Geopark Suðuroy heldur fram, og at fyrireikingarbólkurin fær heimild til at gera eitt ítøkiligt uppskot til skipan av einum felags kommunalum felagi, sum kann reka og umsita geoparkina.

Uppskotið skal í minsta lagi lýsa:

- endamálið við felagnum,
- bygnað, leiðslu og ábyrgdarbýti,
- uppgávurnar hjá felagnum,
- fíggingarleist og býtið millum kommunurnar,
- viðtøkur og treytir fyri limaskapi,
- samstarvið við Jarðfeingi og aðrar viðkomandi stovnar,
- mannagongdina fram ímóti eini møguligari UNESCO-umsókn.

Fyrisitingarlig meting

Fyrisitingin metir, at tað er skilagott, at Tvøroyrar kommuna tekur undir við, at fyrireikingararbeiðið heldur fram.

Við hesum verður eingin endalig avgerð tikin um at stovna eitt kommunalt felag, um kommunala fígging ella um at søkja UNESCO um góðkenning. Samtyktin gevur bert fyrireikingarbólkinum heimild til at gera eitt ítøkiligt og fullfíggjað uppskot, sum kommunurnar síðani kunnu taka støðu til á einum upplýstum grundarlagi.

Tað eigur at vera ein treyt, at uppskotið um skipan, viðtøkur og fígging verður lagt fyri Tvøroyrar býráð til endaliga viðgerð, áðrenn kommunan bindur seg til felagið ella tekur á seg fíggjarligar skyldur.

Fíggjarlig viðurskifti

Fíggjarligu avleiðingarnar eru ikki kendar enn.

Fyrireikingarbólkurin skal sum part av arbeiðinum gera uppskot til fíggingarleist, rakstrarætlan og býtið av útreiðslunum millum kommunurnar. Hetta skal leggjast fyri býráðið til serstaka viðgerð og endaliga støðutakan.

Samtyktin í hesum umfari hevur tí ikki í sjálvum sær við sær, at kommunan át tekur sær nakra ávísa fíggjarliga skyldu.

Tilmæli

Mælt verður býráðnum til at samtykkja:

1. at Tvøroyrar kommuna tekur undir við, at arbeitt verður víðari við málinum um at stovna Geopark Suðuroy,
2. at fyrireikingarbólkurin fær heimild til at gera eitt ítøkiligt uppskot til skipan, endamál, fígging og viðtøkur fyri eitt felags kommunalt felag, sum kann reka og umsita Geopark Suðuroy, og
3. at uppskotið til skipan, viðtøkur og fígging verður lagt fyri býráðið til viðgerðar og endaliga støðutakan, áðrenn avgerð verður tikin um, at Tvøroyrar kommuna gerst partur av felagnum.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:

Borgarstjórin mælir til:

1. at Tvøroyrar kommuna tekur undir við, at arbeitt verður víðari við málinum um at stovna **Geopark Suðuroy**,
2. at fyrireikingarbólkurin fær heimild til at gera eitt ítøkiligt uppskot til skipan, endamál, fígging og viðtøkur fyri eitt felags kommunalt felag, sum kann reka og umsita Geopark Suðuroy, og
3. at uppskotið til skipan, viðtøkur og fígging verður lagt fyri býráðið til viðgerðar og endaliga støðutakan, áðrenn avgerð verður tikin um, at Tvøroyrar kommuna gerst partur av felagnum.

Einmælt samtykt.

Býráðið 01. oktober 2026:

Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini frá 23. september 2026, at Tvøroyrar kommuna tekur undir við, at arbeitt verður víðari við málinum um at stovna Geopark Suðuroy. At fyrireikingarbólkurin fær heimild til at gera eitt ítøkiligt uppskot til skipan, endamál, fígging og viðtøkur fyri eitt felags kommunalt felag, sum kann reka og umsita Geopark Suðuroy. Atuppskotið til skipan, viðtøkur og fígging verður lagt fyri býráðið til viðgerðar og endaliga støðutakan, áðrenn avgerð verður tikin um, at Tvøroyrar kommuna gerst partur av felagnum.

Einmælt samtykt.

67/26
25/00458-2 Tvøroyrar skúli - dagføring av skúlagørðum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	08.10.2025	88/25
2 Fíggjarnevndin	05.11.2025	115/25
3 Býráðið	10.11.2025	78/25
4 Mentanarnevndin	14.01.2026	10/26
5 Mentanarnevndin	11.03.2026	24/26
6 Mentanarnevndin	22.04.2026	52/26
7 Tekniska nevnd	08.06.2026	30/26
8 Fíggjarnevndin	10.06.2026	85/26
9 Býráðið	01.10.2026	67/26

Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 25-09-2025
Forkvinnan í Mentanarnevndini hevur á fundi við skúlastýrið í Tvøroyrar skúla fingið uppskot sendandi, sum næmingaráðið í Tvøroyra skúla hevur gjørt, uppá dagføringar á skúlagarðin í nýggja skúla, t.v.s. uttara skúlagarð. Í uppskotinum eru ein sparkivøllur við graslíki, flogbóltsvøllur, hálvur kurvabóltsvøllur og annars ymisk spøl, sum møguliga kunnu teknast niður á asfaltið.

Undirlagið á vøllunum, undantikið sparkivøllin, er verandi asfaltsundirlag.

Atlit eur í uppskotinum tikin fyri, at stigabilurin hjá sløkkiliðnum sleppur at koyra líka vestur ímóti gamla skúla, norðanfyri sparkivøllin.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Avsettar eru 400.000 kr á FÆ2025 §411, *Skúlagarðar fríðkan*

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

Mentanarnevndin 08. oktober 2025:
Georg Muller møtti á fundinum at greiða frá uppskotinum, sum næmingaráðið í Tvøroyra skúla hava gjørt um dagføringar av skúlagarðinum við nýggja skúlan, t.v.s. á uttara skúlagarði. Í uppskotinum er m.a. ein sparkivøllur við graslíki, flogbóltsvøllur, hálvur kurvabóltsvøllur og ymisk spøl, sum kunnu teknast niður

á asfaltið. Georg kunnaði um, at tað ikki ber til at fremja alla fyriliggjandi ætlanina í inniverandi fíggjarári. Neyðugt er fyrst at gera eitt neyðugt forarbeiði, áðrenn ætlanin kann fremjast til fulnar. Einmælt samtykt at heimila Teknisku deild at gjøgnumføra mest møguligt av fyriliggjandi ætlanini innanfyri verandi játtan, og at avseta meir játtan til komandi fíggjarár.

Fíggjarnevndin 05. november 2025:
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum frá mentanarnevndini.

Býráðið 10. november 2025:
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini, at heimila teknisku deild at gjøgnumføra mest møguligt av fyriliggjandi ætlanini innanfyri verandi játtan. Mælt verður til at heita á teknisku umsiting um at kanna og heimila, hvørt tað ber til at flyta uttandurða veinjingar útbúnaðin á matr.nr. 144a til skúlagarðin úti á Tvøroyri. -Einmælt samtykt.

Mentanarnevndin 14. januar 2026:
Forkv. kunnar um, at hon hevur samskift við leiðaran av tekniskudeild, og at málið er í gongd. Avsettar eru á FÆ2026, §411 kr. 400.000,- til dagføringar av skúlagarðinum í Tvøroyrar skúla. Málið verður tikið upp á einum seinni fundi í Mentanarnevndini.

Kommunustjórin 4. mars 2026:
Forkvinnan í Mentanarnevndini, Barbara Michalina Tausen, heitir á umsitingina um at gera eina støðulýsing av málinum "Skúlagarðurin á Tvøroyri" til næsta fund í Mentanarnevndini 11.03.2026. Ynskiligt er at hoyra, hvussu langt arbeiðið er komið í teimum ymsu pørtunum av verkætlanini um dagføring av skúlagarðinum (uttara skúlagarði), har ætlanin fevnir um ymisk spøl/strikur á asfalti og vøllir (t.d. sparkivøll við graslíki, flogbóltsvøll og hálvan kurvabóltsvøll), og at arbeiðið verður gjørt stigvíst innan játtan.

Ynskiligt er, at Tekniski leiðarin Georg Muller møtir á fundinum og greiðir frá støðuni í málinum.

Mentanarnevndin 11. marts 2026:
Georg Muller møtti á fundinum at støðulýsa málið. Kunna bleiv um, at Tekniska Deild hevur vent seg til MTV byggiverkið um at fáa pris at stoypa bandar kring sparkivøllin. Forkv. mælir til at nevndin samtykkir fyriliggjandi ætlan, og at málið verður tikið upp aftur á komandi fundi. -einmælt samtykt.

Mentanarnevndin 22. apríl 2026:
Georg Muller møtti á fundinum og greiddi frá, at Tekniska deild hevur arbeitt við einari ætlan, og at avtala er gjørd við lokalan veitara um at fremja ætlanina, samsv. kunning og verkætlnarlýsing hjá teknisku deild. Frágreiðingin varð einmælt tikin til eftirtektar, og mentanarnevndin mælir til at fremja arbeiði sum fyriliggjandi og kunnað. -Fyribils kostnarmetingin av fyriliggjandi ætlan er kr. 767.750,- og krevur verkætlanin sostatt eykajáttan, sum skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

Viðm. tekniski leiðarin (GM) tann 05.06.2026:
Stoypiarbeiðið er farið í gongd, og innkomin eru tvey tilboð uppá veitan og álegging av graslíkisvølli við tilhoyrandi shockpad og kvartssandi.
Báðar loysnirnar byggja á góðkendar vørur frá veitarum við royndum á marknaðinum og við viðkomandi ávísingum. Harumframt innihalda bæði tilboðini at síggja til somu typu av shockpad, og tað eru tí ikki

staðfest týðandi tøknilig viðurskifti, ið einsamøll kunnu grundgeva fyri stóra prísmuninum millum tilboðini.
Tilboðið frá veitara 1 er 151.000 kr (við møguleika fyri at uppstiga til ein vøll av betri góðsku fyri 10121 kr eyka), ímeðan tilboðið frá veitara 2 er 325.000 kr.
Umsitingin metir, at loysnin frá veitara 1 gevur bestu javnvágina millum kostna og góðsku til ætlaða endamálið. Við atliti at støddini á verkætlanini og teimum upplýsingum, ið fyriliggja, verður ikki mett, at eyka kostnaðurin fyri loysnina frá veitara 2 stendur í rímiligum lutfalli til møguligu fyrimunirnar.
Samstundis skal tó viðmerkjast, at kommunan áður hevur havt gott samstarv við veitara 2, sum hevur veitt eina nøktandi tænastu í sambandi við aðrar verkætlanir. Hetta minkar um veitaratrygdarliga váðan, og eigur at verða tikið við í samlaðu metingina.
Við støði í einari samlaðari meting av kostnaði, góðsku og váða mælir umsitingin til at taka av tilboðnum frá veitara 1, sum fíggjarliga verður mett at vera tann besta loysnin. Samstundis verður gjørt vart við, at kommunan við hesum velur ein veitara, sum kommunan ikki áður hevur samstarvað við.

Leggjast kann afturat, at veitari 2 hevur boðað frá, at hann kann leggja vøllin á um hálvan juli.
Veitari 1 sigur, at tað eigur at vera møguligt at gera tað í summar, men at hann líka má kanna nøkur viðurskifti, áðrenn hann við vissu kann siga, nær arbeiðið kann gerast.

Tekniska nevnd 08. juni 2026:
Nevndin mælir til, at taka tryggasta loysnina, sjálvt um hon er væl dýrari. Veitari 1 hevur einki arbeiði at vísa á, og kann ikki siga nær arbeiðið kann gerast.
Veitari 2 hevur nógvar royndir í Føroyum, og kann gera arbeiðið um hálvan juli.
Tó verður umsitingin biðin um at kanna viðurskiftini enn einaferð, og verður okkurt funnið sum broytir fyritreytirnar munandi, so skal málið takast uppaftur skjótast gjørligt.

Fíggjarnevndin 10. juni 2026:
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at játtanin verður veitt av FÆ2026, §411 »íløga í skúlan» um neyðugt sum eykajáttan.

Kommunustjórin 17.09.2026:
Uppgerð fyri samlaða kostnaðin av skúlagarðinum er **1.076.807 kr**, sum er meiri enn játtað er á FÆ2026, §411 íløgur fríðkan og skúlagarðar. Mælt verður til, at meirkostnaðurin verður veittur av somu greining íløgur FÆ2026, §411, íløgur til skúlan Ventilatión.

Býráðið 01. oktober 2026:
Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við at fullføra dagføringina av skúlagarðinum sambært áður samtyktu verkætlanini. Samlaði kostnaðurin er uppgjørdur til 1.076.807 kr. Mælt verður til, at tann parturin av kostnaðinum, sum er omanfyri tøku játtanina á FÆ2026, § 411, íløgur – fríðkan og skúlagarðar, verður fíggjaður av somu grein, § 411, av játtanini til íløgur í skúlan.
Einmælt samtykt.

68/26
25/00119-1 Eldradepil & íbúðarbygging á Ryggi í Trongisvági

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Sosiala nevnd	12.03.2025	13/25
2 Fíggjarnevndin	20.03.2025	32/25
3 Sosiala nevnd	09.04.2025	18/25
4 Sosiala nevnd	21.05.2025	21/25
5 Fíggjarnevndin	26.05.2025	49/25
6 Býráðið	02.06.2025	38/25
7 Sosiala nevnd	18.06.2025	26/25
8 Fíggjarnevndin	19.06.2025	63/25
9 Sosiala nevnd	23.09.2025	36/25
10 Sosiala nevnd	29.10.2025	39/25
11 Sosiala nevnd	12.11.2025	46/25
12 Sosiala nevnd	17.12.2025	48/25
13 Fíggjarnevndin	22.12.2025	138/25
14 Sosiala nevnd	21.09.2026	19/26
15 Fíggjarnevndin	23.09.2026	103/26
16 Býráðið	01.10.2026	68/26

Málslýsing: Kommunustjórin 09.03.2025
Forkv. í sosialu nevnd hevur heitt á umsitingina um at byrja uppá fyrireiking av bygging av Eldradepil & íbúðarlonum á Ryggi í Trongisvági.

Verkætlanin verður lýst, sum verandi í tveimum byggistigum.

Byggistig 1:

Byggistigið inniheldur íbúðir úr 35m2 til einstakar borgarar upp í 64 m2 til tveir borgarar. Íbúðirnar verða bygdar við øllum vanligum hentleikum, og verða eisini gjørdar til fólk við rørslutarni og eldri sum heild. Nýmótans fráboðanarskipanir verða knýttar at íbúðunum, so at boðað verður frá, um okkurt óvanligt er.

Felagshús verður knýtt at íbúðunum, ið er hugsað sum samlingsstað fyri borgarar í íbúðunum og eisini eldri borgarar uttanífrá til ymisk tiltøk og viðgerðir so sum fysioterapi, eldrafimleik o.tíl.

Byggistig 2:

Byggistig 2 fevnir um eitt røktarheim til 15 røktarkrevjandi borgarar, ið verður partur av eldradeplinum,og kemur m.a.at innihalda 15 kømur, umframt neyðugar almennar funktiónir. Miðan av bygninginum verður yvirdekkað felagsøki við grønum økjum og uppihaldsøkjum. Verkætlanin er hóttað soleiðis, at møguligt er at byggja út, um tørvur verður á tí. Íbúðirnar, felagshúsið og røktarheimið eru staðsett um eina depilsmiðju, og kann depilin útbyggjast til tað tvífalda ella meira.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin játtan er avsett á FÆ2025 til verkætlanina

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

Sosiala nevnd 12. marts 2025:
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at bjóða umboðum fyri MTV byggivirkið á fund við Tvøroyrar býráð fyri at greiða nærri um ætlanina.

Fíggjarnevndin 20. marts 2025:
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd.

Sosiala nevnd 09. april 2025:
Málið verður útsett til fyrst komandi fund.

Sosiala nevnd 21. maj 2025:
Málið var umrøtt og kunnað. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 26. maj 2025:
Einmælt samtykt at hoyra hjá løgfrøðingi, hvørjar heimildir og ásetingar kommunan skal fyrihalda seg til við hesari ætlan. Væntandi verður málið klárt at leggja fyri komandi býráðsfund.

Býráðið 02. juni 2025:
Borgarstjórin kunnar um málið, eftir at hann hevur samskift við løgfrøðingin hjá Kommunufelagnum. Málið verður tikið uppaftur á næsta býráðsfundi.

Býráðið 02. juni 2025:
Borgarstjórin kunnar um málið, eftir at hann hevur samskift við løgfrøðingin hjá Kommunufelagnum. Málið verður tikið uppaftur á næsta býráðsfundi eftir tilmælið frá Anitu Vibergsdóttir. -einmælt samtykt

Kommunustjórin 12. Juni 2025
Umsitingin hevur samskift við løgfrøðingin hjá kommunufelagnum fyri at fáa vegleiðing og ráðgeving um ætlanina at byggja Eldradepil & íbúðarlonum á Ryggi í Trongisvági.

Løgfrøðingurin svarar:
Tvær grundleggjandi fortreytir fyri at hetta skal bera til eru, at kommunan í fyrra lagi hevur heimild at stuðla slíkari bygging og í øðrum lagi lógliga kann virka sum útleigari. Í báðum førum meti eg heimildina vera rættiliga ivasama.

Umsitingin mælir til at fremja aðra av niðanfyri nevndu uppskotum:

1. Kommunan selur grundøkið á Ryggi til privata fyritøku, ið ynskir at fremja fyriliggjandi ætlanina. Sølan skal fara fram samb. áseting í kommunustýrislógin, § 44. "Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment"

2. Kommunan tekur upp samband við Bústaðir um fyriliggjandi ætlan, fyri at fremja eitt trý parts samstarv millum Kommunu, Bústaðir og privatan byggiharra. Kommunan kann t.d. lata grundøkið sum innskot til bygging av alment gagnligum búeindum.

Lógarheimildir:

Kunngerð nr. 2 frá 10. januar 2012 um virksemi hjá Húsalánsgrunninum at útvega bústaðir
§ 5. Húsalánsgrunnurin tekur avgerð um luttøku í verkætlanum við støði í einari heildarmeting um m.a. fíggjarligu útlitini, tørvin á slíkum bústøðum og luttakandi samstarvspørtum.

Løgtingslóg um Húsalánsgrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 29. mai 2024
§ 5 d. 3) Kommuna kann, saman við Húsalánsgrunninum, stovna almannagagnligt bústaðafelag, ið hevur sum endamál at útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu. Stk. 2. Til fígging av bústaðaverkætlan, sum felag sambært stk. 1 stendur fyri, letur kommunan felagnum innskot svarandi til ikki minni enn 10% og ikki meira enn 20% av útveganarkostnaðinum. Innskot kann latast sum peningur ella sum realkapitalur, t.d. byggilendi og byggibúning. Restin av fíggingini verður fingin til vegar við innskoti frá Húsalánsgrunninum, sum ikki má vera minni enn innskotið frá kommununi, og við láni, sum hevur trygd í ognum felagsins.

Sosiala nevnd 18. juni 2025:
Málið var umrøtt og kunnað. -Einmælt samtykt at útseta málið til næsta fund í Sosialu nevnd.

Fíggjarnevndin 19. juni 2025:
Málið verður tikið upp á einum seinni fundi

Kommunustjórin 22.09.2025
Forkv. í Sosialu nevnd hevur heitt á umsitingina við ynskið um, at nevndin tekur málið upp til nýggja viðgerð.

Sosiala nevnd 23. september 2025:
Mortan Vang, stjóri á MTV Byggivirkið, var boðin á fundin at greiða frá ætlanini um bygging av Eldradepli og íbúðum á Tvøroyri. Á fundinum kunnaði hann um, at MTV kann byggja eina líknandi verkætlan á matr. nr. 16 á Sevmýri, sum felagið eigur. Avtala bleiv, at Mortan Vang vendur aftur við meira ítøkiligum upplýsingum til komandi fundi í Sosialu nevnd. -einmælt samtykt

Sosiala nevnd 29. oktober 2025:
Forkv. ynskir at málið verður útsett til næsta fund í sosialunevnd. -einmælt samtykt.

Sosiala nevnd 12. november 2025:
Forkv.- mælir til at umsitingin kannar nærri hesar løgfrøðuligu spurningar:

- Annar spurningurin er, um kommunur kunnu leiga frá privatum fyri at víðarileiga til eldri.
- Hin spurningurin er, hvat ein kommuna kann leiga fyri frá privatum og hvat leigugjaldi skal vera, tá kommunan leigar út aftur/framleigar til eldri.

-Einmælt samtykt

Kommunustjórin 5.12.2024:
Umsitingin hevur samskift við løgfrøðingin hjá kommunufelagnum, sum ma. hevur svara at:

"Eg meti sum áður nevnt hendan ivaspurning -hvørt Tvøroyrar kommuna sjálv, uttanfyri sítt samstarv í BHS hevur heimild at seta á stovn eldraíbúðir. Tað meti eg ikki grundarlag vera fyri at staðfesta í tí, sum táverandi Almannamálaráðið skrivar ella í tí tulking, sum advokaturin hjá MTV Byggivirkið hevur av málunum vera avgerandi fyri, um kommunan í heila tikið kann fara víðari við einum máli sum hesum-. Eg mæli tí til, at ivamálið verður avgreitt við beinleiðis skrivligum fyrispurning frá kommununi til Almanna- og heilsumálaráðið. Eftir hetta ber til at fara inn í nærri metingar av kommunurættarligum viðurskiftum, herundir møgulig krøv til útboð og nærri treytir hesum viðvíkjandi"

Sosiala nevnd 17. december 2025:
Forkv. mælir til at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan. -einmælt samtykt.

Fíggjarnevndin 22. december 2025:
Borgarstjórin mælir til at umsiting samskiftir við áhugaðir partar í fyriliggjandi ætlan, fyri at hoyra hvørjir møguleikar eru. -Einmælt samtykt.

Kommunustjórin 17.09.2026:
Ískoytis málslýsing – møgulig staðseting og bygging av eldradepli

Forkvinnan í Sosialu nevnd hevur ynskt, at nevndin fær kunning um møguliga staðseting av eldradepli í Tvøroyrar kommunu.

Málið varð seinast viðgjørt í Fíggjarnevndini 22. desember 2025. Tá mælti borgarstjórin til, at umsitingin skuldi samskifta við áhugaðar partar í fyriliggjandi ætlan fyri at kanna nærri, hvørjir møguleikar eru. Tilmælið varð einmælt samtykt.

Síðani hesa viðgerð er eingin nýggj ítøkilig støða komin í fyriliggjandi verkætlan á Tvøroyri, sum gevur grundarlag fyri at staðfesta staðseting, byggileist, ognarviðurskifti ella fígging.

Kommunustjórin hevur tó fingið kunning um, at Kommunufelagið framvegis arbeiðir við at kanna, hvørjar løgfrøðiligar forðingar og treytir eru galdandi, tá kommunur ella kommunal samstørv byggja, leiga ella á annan hátt medvirka til at útvega eldraíbúðir. Greiningin er ikki liðug, men kann væntandi vera við til at nágreina heimildirnar og karmarnar fyri teimum ymisku leistunum.

Samskifti við aðrar kommunur

Borgarstjórin hevur samskift við borgarstjórar í øðrum kommunum, sum arbeiða við ella hava umhugsað líknandi verkætlanir við eldradeplum og eldraíbúðum. Ávísar av hesum verkætlanum kunnu í ein vissan mun samanberast við ætlanirnar hjá Tvøroyrar kommunu.

Borgarstjórin boðar frá, at hann á fundinum í Sosialu nevnd kann greiða nærri frá hesum samskiftinum og teimum møguligu byggi-, ognar- og samstarvsleistum, sum hava verið umrøddir.

Kanning av øðrum kommunalum verkætlanum

Umsitingin hevur kannað, um føroyskar kommunur seinastu árini hava selt, langtíðarleigað ella latið kommunalt lendi til bygging av eldraíbúðum.

Eysturkommuna

Eysturkommuna er tað greiðasta og mest samanberiliga dømið, sum umsitingin higartil hevur funnið. Kommunan seldi matrikkul nr. 72ab í Norðragøtu til privata toymið aftan fyri eina verkætlan um 34 eldravinarligar íbúðir upp at verandi eldrasambýli.

Lendissølan varð samtykt í 2021, meðan ítøkiliga samstarvsavtalan millum Eysturkommunu og P/F Eyðabø varð undirskrivað í mai 2024. Sambært ætlanini verða 26 íbúðir bygdar í fyrstu atløgu, og lendið til átta íbúðir afturat verður gjørt byggibúgvið.

Sambært almennari kunning byggir og eigur privati byggiharrin íbúðirnar. Samstundis er avtala gjørd um, at Eysturkommuna og Eldratænastan Nánd kunnu gera brúk av nøkrum av íbúðunum. Arbeitt verður eisini við at knýta heimarøkt og aðrar tænastur at teimum búfólkum, sum hava tørv á tí.

Aðrar kommunalar ætlanir

Kanningin vísir eisini á aðrar kommunalar ætlanir við eldraíbúðum og búplássum, men hesar eru ikki beinleiðis samanberiligar:

- **Tórshavnar kommuna** hevur sett kommunalt øki av til nýtt røktarheim á Stórubrekku í Hoyvík við 64 búplássum, 16 røktaríbúðum og dagtilboði. Kommunan er sjálv byggiharri.
- **Vága kommuna** hevur kannað tørvin á eldraíbúðum og umrøtt møguleikan fyri slíkum íbúðum nær Ellisheiminum. Umsitingin hevur ikki staðfest, at endalig avgerð er tikin um lendissølu ella tillutan.
- **Sjóvar kommuna** hevur boðið kommunalt lendi út til fjølbroytta bústaðarbygging. Talan er tó ikki um eina staðfesta, serstaka eldraíbúðarverkætlan.

Við einari trongari tulking – at kommunalt grundøki verður selt ella latið privatum byggiharra við tí ítøkiliga endamáli at byggja eldravinarligar íbúðir – er Eysturkommuna sostatt einasta greitt skjalprógvaða dømið, sum umsitingin higartil hevur funnið.

Verkætlanin í Norðragøtu kann vera viðkomandi sum samanberingargrundarlag, tí kommunan hevur selt lendið, meðan ein privatur byggiharri byggir, eigur og stendur fyri útleiguni. Kommunan og eldratænastan hava samstundis gjørt avtalu um nýtslu av ávísum íbúðum og um tænastur til eldri borgarar.

Hetta staðfestir tó ikki í sjálvum sær, at sami leistur kann nýtast av Tvøroyrar kommunu. Áðrenn støða verður tikin til eina ítøkiliga loysn, eigur m.a. at verða kannað:

- hvussu lendissølan og samstarvið millum Eysturkommunu, Eldratænastuna Nánd og privata eigaran eru skipað;
- hvørjar treytir eru knýttar at nýtslu, útleigu og tillutan av íbúðunum;
- um kommunan ella eldratænastan hava átikið sær fíggjarligar skyldur ella váða;
- og hvørji útboðs-, stuðuls- og kommunalrættarlig atlit eru tikin.

BHS2035 – tilmæli um nýggjan eldradepil á Tvøroyri

Í strategiætlanini BHS2035 verður mælt til, at eldraøkið í Suðuroy fram ímóti 2035 verður skipað kring tveir eldradeplar:

- Hamragarð saman við Eiðisgarði í sunnaru helvt av oynni;
- ein nýggjan eldradepil á Tvøroyri í norðaru helvt.

Nýggi eldradepilin á Tvøroyri er sambært strategiætlanini ætlaður at fevna um:

- 40 røktarbúpláss;
- 12 eldravinarligar búeindir í nánd av deplinum;
- dagtilhald, veitslu- og felagshøli;
- venjingar- og undirvísingarhøli;
- skrivstovur til umsiting, terapeutar og heimatænastu;
- stórkøk, vaskarí og goymslu.

Mælt verður til, at tænastur og starvsfólk verða savnað á deplinum fyri at fáa betri samskipan, fakliga dygd og gagnnýtslu av starvsfólkaorkuni. Depilin skal vera eitt opið og virkið felagsstað fyri búfólk, heimabúgvandi eldri, avvarðandi og sivilsamfelagið.

Eisini eigur depilin at verða skipaður við serligum eindum, sum taka atlit til ymiskan tørv, eitt nú hjá borgarum við demensi og eldri røktarkrevjandi borgarum.

Staðseting

BHS2035 ásetur ikki eina ítøkiliga staðseting á Tvøroyri. Mælt verður tó til, at depilin, um gjørligt, verður staðsettur nær býnum, kirkju, handli og øðrum tænastum.

Dentur verður lagdur á góða atkomu og tryggar gonguleiðir uttan brattar brekkur og aðrar forðingar, so búfólkini kunnu flyta seg trygt í nærumhvørvinum og framhaldandi kenna seg sum part av býnum.

Hesi atlit eiga tí at vera partur av einari komandi samanbering og meting av møguligum staðsetingum.

Kostnaður og fígging

Samlaði byggikostnaðurin fyri eldradepilin er fyribils mettur til umleið 187 mió. kr., íroknað 10 prosent í fíggjarligari trygd.

Verður roknað við einari afturbering frá landinum á 30 mió. kr., er nettokostnaðurin mettur til umleið 157 mió. kr. Talan er um eina yvirskipaða meting, sum m.a. er treytað av staðseting, lendisarbeiði, byggihátti og endaliga innihaldinum í deplinum.

Í BHS2035 verður staðfest, at kommunurnar í Suðuroy ikki megna at fíggja byggingina við verandi fíggjarorku og fíggingarskipan. Mælt verður tí til, at landsstýrið tryggjar kommununum lagaligar fíggingarmøguleikar, møguliga umvegis Landsbanka Føroya.

Eldraíbúðir og vardar íbúðir

Í strategiætlanini verður harumframt mælt til, at nógv fleiri eldraíbúðir og vardar íbúðir verða bygdar í Suðuroy.

Samstundis verður staðfest, at vanlig bústaðarbygging ikki er ein uppgáva hjá BHS, men einum øki hjá kommununum og landsmyndugleikunum. Bústaðir verður nevnt sum ein týðandi samstarvspartur.

Kommunurnar eiga í sínum planleggingararbeiði at skapa góðar og lagaligar karmar fyri bygging av eldraíbúðum í samráð við BHS og aðrar viðkomandi partar. Stýrið og leiðslan í BHS eiga somuleiðis at hava tætt og regluligt samskifti við kommunurnar um byggingina og tørvin hjá eldri borgarum.

Samlað niðurstøða og tilmæli

BHS2035 staðfestir ein framtíðar tørv á einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri, men tekur ikki støðu til ítøkiliga staðseting, eigaraviðurskifti ella endaligan byggi- og fíggingarleist. Strategiin tekur heldur ikki støðu til, um kommunan, BHS, Bústaðir ella ein privatur byggiharri skal byggja og eiga depilin.

Mælt verður til, at Tvøroyrar kommuna heitir á stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy um at taka undir við tilmælinum hjá strategibólkinum í BHS2035 og at taka ítøkulig stig til at skipa eldraøkið í Suðuroy kring tveir eldradeplar, har annar verður ein nýggjur eldradepil á Tvøroyri.

Hetta merkir at áheitan verður sent til stýrið fyri BHS um at fremja ætlanina samsvarandi strategiætlanini, herundir at:

- gera neyðugu tørvs- og virksemisgreiningina;
- nágreina innihaldið og framtíðar kapasitetin á deplinum;
- kanna og meta um hóskandi staðseting á Tvøroyri;
- fáa greiðu á byggi-, ognar- og fíggingarleistinum;
- og fyrireika projektering, fígging og útboð í samstarvi við avvarðandi kommunur og landsmyndugleikar.

Málið verður lagt aftur fyri Tvøroyrar kommunu til politiska støðutakan, tá neyðugu fakligu, løgfrøðiligu og fíggjarligu greiningarnar fyriliggja.

Sosiala nevnd 21. september 2026:
Málið varð umrøtt og kunnað. Sosiala nevnd tekur frágreiðingina frá umsitingini, dagfesta 17.09.2026, til eftirtektar. Sosiala nevnd mælir til, at stýrið fyri BHS verða víst á byggilendi, har ein eldradepil kann staðsetast. Mælt verður til at raðfesta økið Inni á Ryggi, matr.nr. 144a og 144bl, sum fyrsta val og matr.nr. 222d á Tangatrøðni sum annað val. Talan er í báðum førum um byggilendi, sum eru ogn hjá Tvøroyrar kommunu. -Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við at heita á stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy um at fremja ætlanina um at byggja ein nýggjan eldradepil á Tvøroyri, og at víst verður á matr. nr. 222d á Tangatrøðni og á økið Inni á Ryggi, matr. nr. 144a og 144bl. -Málið verður beint í býráðið til endaliga støðutakan.

Býráðið 01. oktober 2026:
Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við samtyktini hjá Fíggjarnevndini frá 23. september 2026 og heitir á stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy um at arbeiða víðari við ætlanini um at byggja ein nýggjan eldradepil á Tvøroyri. Í hesum sambandi verður víst á matr. nr. 222d á Tangatrøðni og økið Inni á Ryggi, matr. nr. 144a og 144bl, sum møgulig byggiøki.
Einmælt samtykt.

69/26
26/00297-3 Kirkjugarðurin undir Akurgerði - Ætlanir fyri víðkan 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	14.09.2026	36/26
2 Fíggjarnevndin	23.09.2026	98/26
3 Býráðið	01.10.2026	69/26

Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 18.08.2026:

Mælt verður til at gera eina verkætlan í mun til, at kirkjugarðurin undir Akurgerði kann víðkast eystureftir, vísandi til samtykt í Teknisku nevnd tann 10. marts 2025, mál nr. 25/00107:

"Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum. Arbeiðið við at víðka kirkjugarðin longur eystur skal setast í gongd so skjótt sum til ber. Nevndin heitir á teknisku deild at fáa garðin oman ímóti bakkanum víðkaðan eystureftir, og at planta trø ímóti húsunum eystanfyri kirkjugarðin í samráð við nærmastu grannarnar."

Eftir at ætlanirnar við nýggja grótbrotinum á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13 eru ógreiðar í løtuni, og tørvurin á nýggjum gravarplássum enn er stórur, verður mælt til at endurskoða ætlanirnar.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

Tekniska nevnd 14. september 2026:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Málið verður beint víðari í Fíggjarnevndina. Einmælt samtykt.

Kommunustjórin 16.09.2026: ***(Framhaldsmálslýsing – mál nr. 26/00297)***
Kirkjugarðurin undir Akurgerði – víðkan eystureftir við atliti at eldri býráðssamtyktum
Málið varð viðgjørt í Teknisku nevnd tann 14. september 2026, har nevndin einmælt tók undir við tilmælinum frá umsitingini um, at gjørd verður ein verkætlan við atliti at víðka kirkjugarðin undir Akurgerði eystureftir, vísandi til eldri mál 25/00107, sum bleiv viðgjørt og samtykt 10. mars 2025 í teknisku nevnd.

Søguliga gongdin:
Í máli nr. 25/00107 samtykti Tekniska nevnd tann 10. mars 2025, at arbeiðið við at víðka kirkjugarðin eystureftir skuldi setast í gongd skjótast gjørligt. Fíggjarnevndin tók undir við hesum tann 20. mars 2025, og Býráðið samtykti tann 31. mars 2025 einmælt at víðka kirkjugarðin eystureftir og heitti á umsitingina um at projektera ætlanina við hægstu raðfesting.
Seinni varð kósin tó broytt. Býráðið samtykti tann 2. juni 2025, eftir tilmæli frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini, at heimila umsitingini at arbeiða víðari við einari ætlan um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13, hetta í samband við gróttøku.

Tann 17. juli 2025 tók Býráðið undir við einari broyttari loysn, har atkomuvegurin oman til kirkjugarðin skuldi flytast eystureftir, soleiðis at plass fekst fyri umleið 120 nýggjum gravum. Samstundis varð býráðssamtyktin frá 31. mars 2025 um víðkan eystureftir ógildað.

Við nýggju samtyktini í Teknisku nevnd tann 14. september 2026 verður nú aftur mælt til at arbeiða við einari verkætlan fyri víðkan av verandi kirkjugarði eystureftir. Tí mælir kommunustjórin samstundis til, at taka støðu til tær eldri býráðssamtyktirnar í máli nr. 25/00107, soleiðis at ein greið og eintýdd politisk heimild fyriliggur fyri víðari arbeiðinum.

Umsitingarlig meting
Um Býráðið tekur undir við, at gjørd verður ein verkætlan fyri víðkan av kirkjugarðinum undir Akurgerði eystureftir samsv. nýggja tilmælinum hjá teknisku nevnd 14. Sep. 2026, verður mælt til:

- at ógilda býráðssamtyktina frá 2. juni 2025 um at arbeiða víðari við staðseting av einum nýggjum kirkjugarði á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13, og
- at ógilda tann partin av býráðssamtyktini frá 17. juli 2025, um at flyta atkomuvegurin oman til kirkjugarðin eystureftir, men at halda fast um samtyktina at vikað plass til 120 nýggjum gravir.

Við hesum verður grundarlagið greitt, og umsitingin verður heimila at arbeiða víðari við ætlanini um at víðka verandi kirkjugarð undir Akurgerði eystureftir.

Endalig støða verður tó ikki tikin til nágreiniligt skap, markaviðurskifti, teknisku loysnina ella kostnaðin, fyrr enn verkætlan við tekningum og kostnaðarmeting fyriliggur. Málið verður tá lagt aftur fyri politiska viðgerð.

Fíggjarlig viðurskifti
Verkætlanargerðin og ein møgulig víðkan av kirkjugarðinum hava fíggjarligar avleiðingar. Endaligur kostnaður kann ikki staðfestast, fyrr enn projektering og kostnaðarmeting eru gjørd.
Møgulig játtan til projektering og seinni verkliga fremjan verður at viðgera serskilt í sambandi við fíggjarætlan og/ella eykajáttan.

Tilmæli
Umsitingin mælir til:

1. at Býráðið viðgerð og tekur støðu til samtyktina hjá Teknisku nevnd frá 14. september 2026 um, at gjørd verður ein verkætlan fyri víðkan av kirkjugarðinum undir Akurgerði eystureftir.
2. Um Býráðið tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, er neyðugt at ógilda býráðssamtyktina frá 2. juni 2025 í máli nr. 25/00107 um at arbeiða víðari við ætlanini um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13, og
3. at ógilda tann partin av býráðssamtyktini frá 17. juli 2025 í máli nr. 25/00107, sum ógildaði býráðssamtyktina frá 31. mars 2025 um at víðka kirkjugarðin undir Akurgerði eystureftir, og samtyktina um at flyta atkomuvegin eystureftir, og

4. at staðfesta, at grundarlagið fyri víðari arbeiðinum er at projektera eina víðkan av verandi kirkjugarði undir Akurgerði eystureftir, og at ítøkilig verkætlan við tekningum, markaviðurskiftum og kostnaðarmeting verður løgd aftur fyri Býráðið til endaliga støðutakan.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:

Borgarstjórin mælir til, at Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd frá 14. september 2026. Og at fíggjarnevndin mælir býráðnum til at ógilda býráðssamtyktina frá 2. juni 2025 í máli nr. 25/00107 um at arbeiða víðari við ætlanini um at staðseta nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13.

Samstundis verður mælt til at ógilda tann partin av býráðssamtyktini frá 17. juli 2025 í máli nr. 25/00107, sum ógildaði býráðssamtyktina frá 31. mars 2025 um at víðka kirkjugarðin undir Akurgerði eystureftir og samtyktina um at flyta atkomuvegin eystureftir.

Mælt verður harumframt til at staðfesta, at grundarlagið fyri víðari arbeiðinum er at projektera eina víðkan av verandi kirkjugarði undir Akurgerði eystureftir, og at ein ítøkilig verkætlan við tekningum, markaviðurskiftum og kostnaðarmeting verður løgd aftur fyri Býráðið til endaliga støðutakan.

Einmælt samtykt

Býráðið 01. oktober 2026:
Form. í teknisku nevnd kunnar um málsgongdina og mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini og samtykkir:
1. at arbeiðast skal víðari við einari verkætlan fyri at víðka verandi kirkjugarð undir Akurgerði eystureftir,
2. at býráðssamtyktin frá 2. juni 2025 í máli nr. 25/00107 um at arbeiða víðari við ætlanini um nýggjan kirkjugarð á matr. nr. 25c, 26b, 27d og 13 verður ógildað.
Einmælt samtykt.

70/26
25/00026-1 TB Tvøroyrar Bóltfelag -ynskið um fótbóltshøll við Stórá

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	11.02.2025	11/25
2 Fíggjarnevndin	24.02.2025	15/25
3 Mentanarnevndin	07.04.2025	39/25
4 Mentanarnevndin	08.10.2025	89/25
5 Fíggjarnevndin	23.01.2026	8/26
6 Býráðið	29.01.2026	3/26
7 Tekniska nevnd	09.03.2026	16/26
8 Fíggjarnevndin	10.03.2026	44/26
9 Fíggjarnevndin	27.04.2026	54/26
10 Býráðið	05.05.2026	11/26
11 Býráðið	01.10.2026	70/26

Málslýsing: Kommunustjórin14.01.2025
Form. í Tvøroyrar Bóltfelag -André Dalfoss- hevur vent seg til umsitingina við tankum/ynskið um at ein fótbóltshøll verður uppsett á matr. nr. 144a, ið er eystan fyri verandi vøllin við Stórá.

Tað er enn ikki greitt hvat kostnaðurin verður ella hvussu fíggingin verður

Form. í TB er enn ikki greiðir um hvat kostnaðurin verður. Sagt verður at talan eru um fleiri møguligar loysnir, sum dekka tørvin og ynskið hjá TB, og verður víst m.a. í eina “small size” høll í Hafnarfjörði.

Um farast skal víðari við hesum tankum/ynskið, tørvar TB í fyrsta umfari, at hoyra um Tvøroyrar kommuna er jalig fyri hesari ætlan, og um kommunan er sinnað at lata eina fótbóltshøll byggja á økinum við Stórá.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Tað er enn ikki greitt hvat kostnaðurin verður ella hvussu fíggingin verður, hetta velst m.a. um hvørjar møguligar loysnir kunna fremjast.

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:
André Dalfoss møtti til fundin at greiða frá ætlanum um at uppsetta eina høll á ítróttarøkkinum í Trongisvági. Mentanarnevndin er jalig fyri uppskotinum og heitur á TB um at arbeiða víðari við málinum.

Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:
Málið umrøtt og kunnað.

Kommunustjórin 02.04.2025:
Form. í Tvøroyrar bóltfelag, hevur sent umsitingin upplýsingar/tilboð uppá høll, Goal Station v.m. Padel bana.

Tilboð 2889.pdf
Talan er um Padel bana ink. ljós kr. 0,4mió
Tilboð 2906.pdf
Talan er um Goal station vøll v.m kr. 2,4mió.
Tilboð 2905.pdf
Telthall 30x65x6 kr. 4.5mió

Íalt **kr. 7,3mió íroknað mvg *(kr. 5,8 mió ex. mvg)***

Mentanarnevndin 07. april 2025:
Forkv. mælir til at kommunustjórin kannar hvørjar líknandi høllir eru, í Føroyum ella í Norðanlondum, har nevndin kann vitja fyri at fáa nærri vitan um tørv og loysnir. Játtan til kunningarferð verður funnin av §411. -Einmælt samtykt.

Mentanarnevndin 08. oktober 2025:
Málið var umrøtt og kunnað. -Einmælt samtykt, ikki at fara víðari við fyriliggjandi uppskot fyribils, at byggja eina fótbóltshøll á matr. nr. 144a, ið er eystan fyri verandi vøllin við Stórá. -Málið verður møguliga tikið upp seinni.

Kommunustjórin 15.01.2026:
Umsitingin hevur hin 14. Januar 2026, móttikið teldupost frá Kristin Dam Ziska, aðalskrivari í Fótbóltssamband Føroya við kunning til allar kommunur um:

FSF bjóðar kommununum at søkja stuðul til bygging av fótbóltshallum (bæði fullstødd og smærri 9ara/7ara hallir), sum liður í at menna fótbóltin alt árið.

Stuðulin kemur úr FIFA Forward 3.0 og kann vanliga vera 15–20% av samlaða kostnaðinum (í serstøkum førum meir). FSF kann ialt søkja um 19 mió. kr. í hesum umfari, og stuðul verður fyrst og fremst latin til verkætlanir í 2026–2027.

Freist: Kommunur við áhuga skulu boða FSF frá í seinasta lagi 2. mars 2026, við upplýsingum um høllslag, staðseting, yvirskipaða tíðarætlan og kostnaðarmeting, og vátta at verkætlanin er ætlað at verða framd í 2026/2027.

FSF fer síðani at meta um innkomnar fráboðanir og boða aftur við, hvussu stóran stuðul tey kunnu lata.

Treytir: Verkætlanir skulu lúka krøvini í FIFA Forward 3.0, og kommunan hevur ábyrgd av skjalprógvi og at treytir verða fylgdar.

Fígging:
Ongin játtan er avsett til bygging av høll, ið lúkar krøvini í FIFA Forward 3.0, men kr. 300.000,- eru avsettar til at byggja uppí verandi ítróttarhøll eystureftir, soleiðis at pláss verður til eina hálva venjingarhøll til ítróttarvirksemið, fundarhølir til feløgini, sum hava sítt virksemi í Ítróttarhøllini, umframt goymslu. (Mál: 25/00113 og 26/00036)

Fíggjarnevndin 23. januar 2026:
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at heimila teknisku deild at arbeiða víðari við einari ætlan at staðseta eina høll, ið lúkar krøvini hjá FIFA Forward 3.0 á økinum við Stórá, har verkætlanin lúkar krøvini sum FSF setur til søkja um stuðul. – játtanin verður veitt sum eykajáttan av innistandandi

Býráðið 29. januar 2026:
Borgarstjórin greiddi frá møguleikanum at byggja fótbóltshøll við stuðul frá FSF. Borgarstjórin mælir til at heita á og heimila teknisku deild at kanna staðsetingar, tørv og kostnað av einari høll, og søkja FSF um stuðul til at byggja eina fótbóltshøll. -einmælt samtykt

Kommunustjórin 02.mars 2026:
Umsitingin hevur samskift við BRIM ark., sum hevur framleitt skitsu uppskot við tilmælið um staðseting og kostnarmeting. Tvøroyrar kommuna hevur -innan freistin at søkja 2. mars- sent FSF umsókn um stuðul til bygging av fótbóltshøll við Stórá. Umsóknin er grunda á lýsing og tekningar hjá BRIM ark., og tekur hesi fyrvarni:

Slag av høll og høvuðsdata:
Talan er um eina innandura fótbóltsvenjingarhøll (7-ara stødd) við hesum mátum:
• Vølli: 30 m x 50 m
• Høll: 38 m x 56 m (2.128 m²)
• Fríhædd: umleið 10 m á miðju og 5,5 m við síðulinjur
• 2 skilaveggjum, so høllin kann býtast í tríggjar 5-ara venjingarvøllir

Staðseting og samvirkan við verandi hentleikar:
Høllin er ætlað staðsett sunnan fyri TB-húsið á økinum við Stórá. Í skitsuuppskotinum er lagt upp til, at nýggjur millumbygningur bindur høllina saman við TB-húsið, so verandi hentleikar (t.d. umklæðing, uppihald o.a.) kunnu verða partur av heildarloysnini. Samstundis er dentur lagdur á góða atkomu og funktionalitet, herundir eisini atkomu hjá rørslutarnanum.

Fyrivarni í umsóknini:
Umsóknin verður send sambært einmæltari býráðssamtykt 29.01.2026 og er at skilja sum ein innlating til at verða tikin við í meting/útlutan av stuðli hjá FSF til at byggja fótbóltshallir. Endalig avgerð um bygging og fígging (t.d. lántøku, útboð og endaligar kostnaðir) verður treytað av seinni formligari politiskari viðgerð í býráðnum, eftir at samlaði kostnaðurin fyri kommununa er kendur. Tvøroyrar kommuna tekur somuleiðis fyrivarni fyri, at høllin kann tryggjast á nøktandi hátt og við rímiligum treytum hjá føroyskum tryggingarfelagi.
Næstu stigini:
Málið verður lagt fyri fyrst til Teknisku nevnd, fyri at nevndin gevur umsitingini greiða heimild at fáa tað byggitøkniliga grundarlagið upp á pláss (kanningar, byggiloyvið, myndugleikaviðurskifti og heildarkostnað), so málið kann leggjast aftur fyri nevnd/býráð við einum greiðum og fullfíggjaðum avgerðargrundarlagi, tá svar fyriliggur frá FSF.

Tekniska nevnd 09. marts 2026:
Nevndin heldur ikki, at tað er skilagott at byggja eina fótbóltshøll í verandi løtu – tað eru onnur mál, ið eiga at raðfestast hægri. Einmælt samtykt.

Fíggjarnevndin 10. marts 2026:
Borgarstjórin mælir til, at fíggjarnevndin tekur støðu til málið, eftir at svar er komið frá Fótbóltsambandinum um stuðul verður latin til at byggja ein fótbóltshøll við Stóra, samsv. umsókn frá Tvøroyrar kommunu, og hvørjar treytir fylgja við. -Einmælt samtykt

Kommunustjórin 20.04.2026:
Borgarstjórin og kommunustjórin hava hin 20.04 verið á fundi í FSF-húsinum í Havn, har fráboðanin varð kunngjørd um, at Fótbóltssamband Føroya (FSF) ynskir at stuðla fyriliggjandi verkætlanini hjá Tvøroyrar kommunu at byggja fótbóltshøll við Stórá við kr. 4.000.000,-

Treytir fyri stuðlinum eru:

- Váttan um fígging av verkætlanini skal fyriliggja í seinasta lagi **1. desember 2026**.
- Bygningsarbeiðið skal verða sett í verk í seinasta lagi í **2027**.
- Stuðulsmóttakarin skal tryggja, at allar treytir í **FIFA Forward 3.0**-skipanini verða loknar.
- FSF fær framíhjárætt at nýta fótbóltshøllina sambært nærri avtalu og uttan kostnað.

Umsitingin tekur somuleiðis til eftirtektar, at tað sambært fundinum við FSF er ein opið møguleiki at broyta støddina á høllini frá 7-ara til 9-ara (treytað av nærri meting og fígging).

Víðari framferð / viðgerð:
Málið verður fyrst lagt fyri Fíggjarnevndina til ummælis, áðrenn málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:
Fíggjarnevndin tekur avgerðina hjá FSF til eftirtektar at veita stuðul til bygging av fótbóltshøll við Stórá.

Býráðið 05. mai 2026:
Málið var umrøtt og kunnað

Kommunustjórin 27.09.2026 – ískoyti til málslýsingina

Borgarstjórin hevur heitt á kommunustjóran um at seta málið um bygging av fótbóltshøll við Stórá á skrá til komandi býráðsfund.

Ein áhugabólkur hevur vent sær til borgarstjóran og umsitingina við ynski um at fáa heimild til at arbeiða víðari við ætlanini um at byggja fótbóltshøll við Stórá.

Áhugabólkurin er umboðaður av **Nadhem Zid, Teitur Rubæk Rasmussen, Mikal Jespersen og Tórður Hentze**.

Tvøroyrar kommuna hevur í sambandi við verkætlanina fingið boð um játtaðan stuðul á **4,0 mió. kr. frá Fótbóltssambandi Føroya (FSF)**, treytað av teimum krøvum, sum eru knýtt at FIFA Forward 3.0-skipanini.

Áhugabólkurin hevur lagt fram hugsanir um at menna upprunaligu ætlanina víðari, soleiðis at talan ikki bert verður um eina fótbóltshøll, men um eina breiðari **multi- og venjingarhøll**, sum verður ein natúrligur og integreraður partur av verandi ítróttarøki við Stórá.

Hugsanin er, at verandi fótbóltsvøllur, felagshús og aðrir hentleikar á økinum verða partur av einari samlaðari ítróttarloysn. Endamálið er at skapa betri møguleikar fyri innandura rørslu, venjing og bóltspæl alt árið fyri børn, ung, vaksin og eldri og fyri ítróttarfeløg og aðrar brúkarabólkar í kommununi og oynni.

Verkætlanin byggir víðari á ta ítróttarligu søgu og tað virksemi, sum longu er við Stórá, herundir Tvøroyrar Bóltfelag, sum er elsta fótbóltsfelag í landinum, umframt onnur ítróttarfeløg og felagsvirksemi í kommununi.

Ein nýggj multi- og venjingarhøll við Stórá kann harumframt væntast at **leysgeva venjingartímar og pláss í verandi ítróttarhøll**, tí partur av virkseminum, sum í dag fer fram har, kann flytast til nýggju høllina. Hetta kann geva øðrum ítróttargreinum og brúkarabólkum betri atgongd til verandi ítróttarhøll og harvið økja um samlaða kapasitetin fyri ítrótt og rørslu í kommununi.

Áhugafelag undir stovnan

Persónarnir aftan fyri áhugabólkin arbeiða við at stovna eitt sjálvstøðugt, ikki-vinnuligt áhugafelag, sum skal arbeiða víðari við at menna verkætlanina og kanna møguleikarnar fyri uttanhýsis fígging.

Ein týðandi uppgáva verður at søkja um stuðul frá grunnum, feløgum, fyritøkum og øðrum almennum og privatum stuðulsveitarum.

Fyri at slíkar umsóknir skulu hava eitt haldgott grundarlag, er neyðugt at staðfesta, hvør kommunali leikluturin kann vera, og hvørja undirtøku áhugafelagið kann vísa til í sínum umsóknum.

Kommunal luttøka

Lagt verður upp til, at Tvøroyrar kommuna við samtykt gevur áhugabólkinum og áhugafelagnum undir stovnan heimild til at arbeiða víðari við verkætlanini og søkja um uttanhýsis stuðul við tilvísing til kommunala undirtøku.

Sum partur av hesum verður lagt upp til, at kommunan er sinnað at lata hóskandi kommunalt grundøki á ítróttarøkinum við Stórá til verkætlanina, treytað av endaligari staðseting, projektering og góðkenning.

Somuleiðis verður lagt upp til, at kommunan er sinnað at taka á seg framtíðar raksturin av høllini eftir nærri avtalu og góðkendari rakstrarætlan. Hetta verður at síggja sum ein víðkan av tí kommunala leiklutinum, sum longu er í rakstrinum av ítróttarkørmunum við Stórá og ítróttarhøllini.

Henda kommunala undirtøkan kann verða fráboðað í umsóknum um stuðul, tó við greiðum fyrivarni um, at endalig bygging, fígging, ognarviðurskifti og bindandi kommunalar skyldur skulu leggjast fyri býráðið aftur til serstaka støðutakan.

Stuðulin frá FSF

Tvøroyrar kommuna hevur fingið játtaðan stuðul á **4,0 mió. kr.** frá FSF til upprunaligu ætlanina um eina **7-ara fótbóltshøll** við Stórá.

Í samskiftinum um verkætlanina hevur FSF givið til kennar, at **nýttuvirðið av einari 9-ara høll verður mett hægri**, og at FSF sær positivt upp á, at verkætlanin verður ment frá einari 7-ara høll til eina 9-ara høll. Somuleiðis er givið til kennar, at ein slík víðkan kann lata upp fyri møguleikanum fyri **hægri stuðli frá FSF**, treytað av nærri viðgerð, fígging og teimum krøvum, sum annars eru galdandi fyri stuðulin.

Hetta gevur grundarlag fyri, at áhugabólkurin í sínum víðari arbeiði ikki verður avmarkaður til upprunaligu 7-ara loysnina, men fær heimild til eisini at kanna og menna eina **9-ara høll**, um henda loysnin vísir seg at hava størri ítróttarligt og samfelagsligt nýttuvirði og kann fíggjast á einum haldgóðum grundarlagi.

Í hesum arbeiðinum skal áhugabólkurin eisini kanna møguleikan fyri hægri stuðli frá FSF og øðrum stuðulsveitarum til eina 9-ara/multihøll.

Tíðarfreist

Borgarstjórin mælir til, at áhugabólkurin fær heimild til at arbeiða víðari við verkætlanini fram til **15. desember 2026**, tá málið verður tikið upp aftur til støðutakan.

Tilmæli til samtyktar av Tvøroyrar býráð

Borgarstjórin mælir býráðnum til at samtykkja:

1. At geva áhugabólkinum og áhugafelagnum undir stovnan heimild til at arbeiða víðari við ætlanini um eina fótbóltshøll/multihøll við Stórá.
2. At áhugabólkurin fær heimild til at menna verkætlanina víðari bæði sum **7-ara og 9-ara høll**, og serliga kanna møguleikan fyri einari 9-ara multi- og venjingarhøll, ið verður integrerað í verandi ítróttarøki við Stórá.
3. At áhugabólkurin í hesum sambandi fær heimild til at taka upp samráðingar og samskifti við FSF um at broyta upprunaligu verkætlanina frá 7-ara til 9-ara høll og kanna møguleikan fyri **hægri stuðli frá FSF** til eina slíka loysn.
4. At áhugabólkurin og áhugafelagið undir stovnan fáa heimild til at søkja um uttanhýsis stuðul frá grunnum, feløgum, fyritøkum og øðrum stuðulsveitarum við tilvísing til hesa býráðssamtykt.
5. At Tvøroyrar kommuna er sinnað at lata hóskandi grundøki á ítróttarøkinum við Stórá til verkætlanina, treytað av endaligari staðseting, projektering, myndugleikagóðkenning og serstakari endaligari býráðssamtykt.
6. At Tvøroyrar kommuna, um verkætlanin verður endaliga góðkend og realiserað, er sinnað at taka á seg raksturin av høllini eftir nærri avtalu og góðkendari rakstrarætlan.
7. At kommunala undirtøkan, herundir ætlað grundøki og framtíðar rakstrarligur leiklutur, kann upplýsast í stuðulsumsóknum, tó við fyrivarni um endaliga politiska góðkenning av verkætlanini og teimum fíggjarligu og rættarligu skyldum, sum kunnu fylgja við.
8. At áhugabólkurin fær freist til **15. desember 2026** at leggja eitt ítøkiligt og meira fullfíggjað uppskot fyri býráðið, har eisini verður greitt frá fyrimunum, kostnaði, fígging og stuðulsmøguleikum við ávikavist 7-ara og 9-ara loysn.
9. At málið eftir hetta verður lagt fyri býráðið aftur til endaliga støðutakan, áðrenn kommunan tekur á seg bindandi fíggjarligar, ognarligar ella aðrar skyldur í sambandi við verkætlanina.

Um býráðið samtykkir omanfyri, mælir kommunustjórin harumframt til, at eitt **politiskt umboð fyri Tvøroyrar kommunu** verður partur av áhugabólkinum, soleiðis at kommunan verður umboðað í arbeiðinum og kann fylgja menningini av verkætlanini, samskiftinum við FSF og aðrar stuðulsveitarar og fyrireikingini av málinum til nýggja politiska viðgerð.

Býráðið 01. oktober 2026:

Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við,

1. At geva áhugabólkinum og áhugafelagnum undir stovnan heimild til at arbeiða víðari við ætlanini um eina fótbóltshøll/multihøll við Stórá.
2. At áhugabólkurin fær heimild til at menna verkætlanina víðari bæði sum 7-ara og 9-ara høll, og serliga kanna møguleikan fyri einari 9-ara multi- og venjingarhøll, ið verður integrerað í verandi ítróttarøki við Stórá.
3. At áhugabólkurin í hesum sambandi fær heimild til at taka upp samráðingar og samskifti við FSF um at broyta upprunaligu verkætlanina frá 7-ara til 9-ara høll og kanna møguleikan fyri hægri stuðli frá FSF til eina slíka loysn.
4. At áhugabólkurin og áhugafelagið undir stovnan fáa heimild til at søkja um uttanhýsis stuðul frá grunnum, feløgum, fyritøkum og øðrum stuðulsveitarum við tilvísing til hesa býráðssamtykt.
5. At Tvøroyrar kommuna er sinnað at lata hóskandi grundøki á ítróttarøkinum við Stórá til verkætlanina, treytað av endaligari staðseting, projektering, myndugleikagóðkenning og serstakari endaligari býráðssamtykt.
6. At Tvøroyrar kommuna, um verkætlanin verður endaliga góðkend og realiserað, er sinnað at taka á seg raksturin av høllini eftir nærri avtalu og góðkendari rakstrarætlan.
7. At kommunala undirtøkan, herundir ætlað grundøki og framtíðar rakstrarligur leiklutur, kann upplýsast í stuðulsumsóknum, tó við fyrivarni um endaliga politiska góðkenning av verkætlanini og teimum fíggjarligu og rættarligu skyldum, sum kunnu fylgja við.
8. At áhugabólkurin fær freist til 15. desember 2026 at leggja eitt ítøkiligt og meira fullfíggjað uppskot fyri býráðið, har eisini verður greitt frá fyrimunum, kostnaði, fígging og stuðulsmøguleikum við ávikavist 7-ara og 9-ara loysn.
9. At málið eftir hetta verður lagt fyri býráðið aftur til endaliga støðutakan, áðrenn kommunan tekur á seg bindandi fíggjarligar, ognarligar ella aðrar skyldur í sambandi við verkætlanina.
10. at býráðið samtykkir tilmælið hjá kommunustjórin, at eitt politiskt umboð fyri Tvøroyrar kommunu verður partur av áhugabólkinum.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá borgarstjóranum.

Atkvøðugreiðsla	Fyri	Ímóti	Blankt
Kristin Michelsen	X		
Anita Vibergsdóttir		x	
Alvi Mortensen	X		
Barbara Michalina Tausen	X		
Eyð Jóna Eidesgaard	X		
Bjarni Hammer	X		
Jens Rói Sørensen	X		
Samandráttur	6	1	0

Barbara Tausen mælir til at Bjarni Hammer verður valdur politiskt umboð hjá Tvøroyrar kommunu í áhugabólkin.

Atkvøðugreiðsla um hvørt Bjarni Hammer verður politiskt umboð í áhugabólkinum.

Atkvøðugreiðsla	Fyri	Ímóti	Blankt
Kristin Michelsen	X		
Anita Vibergsdóttir			X
Alvi Mortensen	X		
Barbara Michalina Tausen	X		
Eyð Jóna Eidesgaard	X		
Bjarni Hammer	X		
Jens Rói Sørensen	X		
Samandráttur	6	0	1

71/26

26/00321-3 Uppskot til broyting av byggisamtyktini - neystaøki (2026)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	14.09.2026	39/26
2 Fíggjarnevndin	23.09.2026	100/26
3 Býráðið	01.10.2026	71/26

Málslýsing:
Legg til merkis:
Hetta málið hevur áður verið fyri í avvarðandi nevndum. Uppskotið varð at enda samtykt í Býráðnum 26.02.2026 og lá frammi til alment eftirlit í lógarásetingini ásettu tíðina, áðrenn tað varð sent Heilsu- og orkumálaráðnum til góðkenningar.

Í skrivi dagf. 17. juli 2026, avvísir Heilsu- og orkumálaráðið málið, og skrivar: "Av tí at málslýsingin í kommunusamtyktini er ógreið og ikki lýsir ætlaðu broytingina nóg greitt, hevur ráðið ikki møguleika at viðgera umbønina um góðkenning."
Soleiðis sum vit tulka tað, góðtekur Heilsu- og orkumálaráðið ikki, at grundgevingar og frágreiðingar eru viðheftar sum sjálvstøðug skjøl. Tískil má alt málið ganga umaftur.

Frágreiðing 10-09-2026:

Endamálið við uppskotinum er at dagføra og greiða reglurnar fyri neystaøkini, so tær betur samsvara við veruligu nýtsluna av neystum og teimum avbjóðingum, sum eru staðfestar seinastu árini.

Í fleiri førum eru neyst og serliga neystaloft longu innrættað til annað enn vanligt bátahald. Hetta er hent uttan greiðar ásetingar í byggisamtyktini, og tí hevur tørvur verið á at fáa eitt greiðari og meira skipað grundarlag fyri, hvussu slík innrætting kann fara fram.

Við broytingini verður staðfest, at neyst framvegis í høvuðsheitum skulu nýtast til bátahald og virksemi knýtt at sjónum. Samstundis verður møguleiki givin fyri, at neystaloft kunnu innrættast til annað hóskandi endamál, tá byggimyndugleikin hevur góðkent hetta.

Broytingin hevur til endamáls at:
- laga reglurnar til verandi og vælkend viðurskifti í neystaøkjunum,
- tryggja eina javna og gjøgnumskygda fyrisiting av umsóknum um innrætting av neystum,
- seta greið krøv til brunatrygd, kloakkviðurskifti og vatnveiting,
- tryggja, at tekniskar og umhvørvisligar treytir verða loknar,
- varðveita sermerktu byggilistarligu og mentanarligu dygdirnar í neystaøkjunum,
- geva kommununi møguleika at stýra útsjónd og menning av økjunum á ein skipaðan hátt.

Samstundis verður mesta loyvda hæddin hækkað úr 5,5 metrum upp í 6,5 metrar til mønuna. Endamálið er at skapa betri og tryggari rúmlig viðurskifti í teimum neystum, sum verða innrættað við loftshædd, uttan at tað grundleggjandi byggisniðið í neystaøkinum verður broytt.

Nýggju ásetingarnar tryggja eisini, at neyst við innleggingum verða knýtt at skipaðari kloakk og vatnveiting, og at somu brunatrygdarligu krøv verða galdandi sum fyri sambygd bústaðarviðurskifti, har fólk kunnu uppihalda sær.

Við hesum verður skapt eitt greiðari og meira tíðarhóskandi regluverk, sum bæði tekur hædd fyri verandi nýtslu og tryggjar, at framtíðar menning av neystaøkjunum fer fram á ein tryggan, skipaðan og fyrisitingarliga haldgóðan hátt. Broytingarnar varðveita samstundis høvuðsendamálið við neystaøkinum sum øki til bátahald og sjóvinnuligt virksemi.

Lógargrundarlag:
Leiðbeining nr. 8001 frá 18. mars 2008 um krøv til byggisamtyktir og øki til frítíðarhús
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar beinleiðis

Tilmælið:
Mælt verður til at broyta ásetingarnar í Byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu, § 33: Øki G: Neystaøki

Frá galdandi ásetingar:

§ 33: Øki G: Neystaøki

1. Økið verður lagt av til neystabygging.
2. Neystini skulu standa ”lið við lið” við skjøldri móti sjónum
3. Skjøldrar skulu vera millum 3 og 5 m breiðir.
4. Neyðugar gøtur kunnu tó vera ímillum.
5. Neystini skulu hava mønu og takhall millum 35 og 50 stig, tó vegleiðandi ”triðingsreyst” (u.l. 42 stig). Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn 2 hæddum (íroknað loftshædd) og ikki verða hægri enn 5,5 m til mønuna mátað frá kotu 2,00.
6. Býráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig byggiætlan verður gjørd fyri samanhangandi part av neystaøkinum.

Til fylgjandi uppskot:

§ 33: Øki G: Neystaøki

1. Økið verður lagt av til neystabygging og bátapláss.

2. Neyst skulu í høvuðsheitum nýtast til bátahald, men neystaloft kunnu innrættast til annað hóskandi endamál, eftir góðkenning frá byggimyndugleikanum.

3. Neystini skulu standa lið um lið við skjøldri móti sjónum, og skjøldrar skulu vera millum 3 og 5 m breiðir. Neyðugar gøtur kunnu tó vera ímillum.

4. Neystini skulu hava mønu og takhall millum 35 og 50 stig, tó vegleiðandi triðingsreising (u.l. 42 stig). Neyst mugu ikki verða bygd í fleiri enn 2 hæddum (íroknað loftshædd) og ikki vera hægri enn 6,5 m til mønuna, mátað frá kotu 2,00.

5. Neyst, sum hava innleggingar, skulu íbindast skipaða kloakk og vatnveiting fyri eigarans rokning.

6. Innrætting av neystaloftum kemur undir somu brunatrygdarligu áseting ímóti grannum, sum samanbygd sethús. Ímóti neystinum undir loftinum eru brunatrygdarligu ásetingarnar tær somu sum fyri bilhús í sethúsum.

7. Býráðið skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum, í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

8. Býráðið kann velja at víkja frá hædd, halli og sniði, um serlig viðurskifti, ella grannabygging, tala fyri tí – ella um serlig byggiætlan verður gjørd fyri samanhangandi part av neystaøkinum.

Uppskotið ber ikki í sær tillagingar av plankortinum

Tekniska nevnd 14. september 2026:
Nevndin tekur undir við tilmælinum. Einmælt samtykt.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:

Borgarstjórin mælir til at Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd um at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri § 33, øki G – neystaøki, sambært fyriliggjandi uppskoti. Broytingin skal skapa eitt greiðari og meira tíðarhóskandi grundarlag fyri nýtslu og menning av neystaøkjunum, samstundis sum høvuðsendamálið við økjunum sum neysta- og bátaplàss verður varðveitt.
Einmælt samtykt.

Býráðið 01. oktober 2026:
Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini um at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri § 33, øki G – neystaøki, sambært fyriliggjandi uppskoti. Broytingin skal skapa eitt greiðari og meira tíðarhóskandi grundarlag fyri nýtslu og menning av neystaøkjunum, samstundis sum høvuðsendamálið við økjunum sum neysta- og bátaplàss verður varðveitt. Uppskotið verður síðani viðgjørt víðari sambært galdandi reglum.
Einmælt samtykt

72/26

26/00322-2 Uppskot til broyting av byggisamtyktiini - Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding (2026)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	14.09.2026	38/26
2 Fíggjarnevndin	23.09.2026	99/26
3 Býráðið	01.10.2026	72/26

Málslýsing:
Legg til merkis:
Hetta málið hevur áður verið fyri í avvarðandi nevndum. Uppskotið varð at enda samtykt í Býráðnum 26.02.2026 og lá frammi til alment eftirlit í lógarásetingini ásettu tíðina, áðrenn tað varð sent Heilsu- og orkumálaráðnum til góðkenningar.

Í skrivi dagf. 17. juli 2026, avvísir Heilsu- og orkumálaráðið málið, og skrivar: "Av tí at málslýsingin í kommunusamtyktini er ógreið og ikki lýsir ætlaðu broytingina nóg greitt, hevur ráðið ikki møguleika at viðgera umbønina um góðkenning."
Soleiðis sum vit tulka tað, góðtekur Heilsu- og orkumálaráðið ikki, at grundgevingar og frágreiðingar eru viðheftar sum sjálvstøðug skjøl. Tískil má alt málið ganga umaftur.

Frágreiðing 10-09-2026:

Endamálið við broytingini er at skapa eitt greiðari og meira smidligt grundarlag fyri menning av frítíðarøkjum í kommununi, samstundis sum dentur verður lagdur á góðsku, náttúruvirði og eina heildarskipan av økjunum.
Grundhugsanin er, at frítíðarhús skulu taka atlit til og geva eitt jaligt íkast til umhvørvið, tey liggja í. Somu ásetingar kunnu til dømis ikki galda fyri frítíðarhús í einum tættum bygdarøki og fyri fríttliggjandi frítíðarhús úti í náttúruni. Tí verða økini nú býtt upp í ymiskar undirflokkar við serligum ásetingum, sum taka hædd fyri staðbundnum viðurskiftum og ymiskum sløgum av frítíðarbygging.
Tað hevur verið stórur áhugi fyri møguleikunum at byggja frítíðarhús, men ynskið hevur ofta verið at gagnnýta egna grund mest møguligt, uttan samstundis at taka ábyrgd av teimum frítíðarvirðum og tænastufunktiónum, sum hoyra til eitt væl skipað frítíðarøki. Við nýggju ásetingunum verða krøv sett um felagsøki, gøtur, parkering, gróðurseting og aðrar hentleikar, so at økini verða skipað sum samanhangandi heildir heldur enn sum einstøk og ósamskipað byggiøki.
Broytingin gevur harumframt størri møguleikar fyri ymiskum sløgum av frítíðar- og ferðavinnuverksemi. Loyvt verður at menna bæði náttúruøki við lítlum umhvørvisárini, tættari frítíðarbýlingar, øki við sjálvstøðugum urtagørðum og skipað kampingøki. Hetta ger tað møguligt at laga menningina eftir staðbundnum fortreytum og teimum tørvum, sum eru hjá bæði eigarum, vitjandi og vinnuligum verkætlanum.
Ein annar fyrimunur er, at krøvini til heildarætlanir tryggja, at neyðug infrakervi og felagsfunktiónir verða hugsað inn frá byrjan. Hetta gevur betri atkomuviðurskifti, tryggari ferðslu, betri ruskviðurskifti og størri virði fyri bæði eigarar og almenning.

Samlað sæð hevur broytingin til endamáls at tryggja eina burðardygga og væl skipaða menning av frítíðarøkjum, har bygging, náttúra og trivnaður verða samansjóðað á skipaðan og framtíðartryggjaðan hátt.

Lógargrundarlag:
Leiðbeining nr. 8001 frá 18. mars 2008 um krøv til byggisamtyktir og øki til frítíðarhús
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar beinleiðis

Tilmælið:
Mælt verður til at broyta ásetingarnar í Byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu, í § 37: Øki L: Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding.

Samstundis verður broytingar í plankortinum, sum eisini eru lýstar herundir:

Galdandi ásetingar:

§ 37: Øki L: Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding

1. Á økinum er loyvt at byggja frítíðarhús, og at skipa øki til húsvognar og tjalding. Bygningar til felags umsiting og tænastuveitingar kunnu byggjast á økinum.
2. Grundstykkini til frítíðarhús skulu vera í minsta lagi 150 m2 til støddar.
3. Loyvt er at gera fleiri frítíðarhús til útleigan á sama matrikli. Tó skal víddin samanlagt svara til minst 150 m2 til hvønn bygning, tá ið lendið lagt av til felags tilhalds- og parkeringøki er drigið frá.
4. Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,5 fyri frítíðarhús.
5. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 6 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Kjallari má tó bert verða til víddar 50% av víddini á stovuhæddini. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.
6. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, sum nevnd eru í 4. stk., tá økið verður roknað sum heild.
7. Býráðið kann krevja, at girðing verður gjørd um økið til hvørt frítíðarhús.
8. Frítíðarhúsini skulu sum minstamát hava lagt el, hita og vatn til húsini og kloakk frá húsunum. Harumframt skulu inni á økinum verða neyðug gøtuljós uppsett. Allar íløgur hesum viðvíkjandi skulu rindast av byggiharranum, umframt at byggiharrin skal rinda gjald fyri íbinding av vatnveiting og kloakk.
9. Skipan og bygging kann bert fara fram sambært góðkendari serstakari byggisamtykt.

Uppskot til Broytingar í ásetingunum - §37 verður deilt upp í 37, 37a, 37b, 37c, 37d:

§ 37: Grundleggjandi ásetingar fyri økini L1 – L4: Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding

1. Endamálið við økjunum er at skapa møguleika fyri frítíðar- og ferðavinnuvirksemi. Hvørt undirøki hevur eitt nágreinað endamál, sum ásetur, hvørji sløg av virksemi og bygging eru loyvd innan hvørt øki. Bygningar til felags umsiting og tænastuveitingar, kunnu byggjast á øllum økjunum. Byggimyndugleikin kann krevja, at felags ruskstøð verður skipað fyri at lætta um ruskinnsavningina.
2. Loyvt er at gera fleiri frítíðareindir til útleigan á sama matrikli, ella at sundurbýta matrikulin eftir nærri ásetingum.
3. Byggistigið er ymiskt fyri undirøkini.
4. Innleggingar: Frítíðarhús skulu sum minstamát hava lagt el, hita og vatn til húsini, og kloakk frá húsunum. Harumframt skulu neyðug gøtuljós verða uppsett inni á økinum. Allar íløgur, hesum viðvíkjandi, skulu rindast av byggiharranum, umframt at byggiharrin skal rinda gjald fyri íbinding av vatnveiting og kloakk.
5. Samlað ætlan: Ein samlað ætlan fyri eitt øki skal gerast, sum skal góðkennast av byggimyndugleikanum og vera bindandi fyri allar partar. Í heildarætlanini fyri økið skal takast hædd fyri, hvussu økið verður skipað sum ein samanhangandi heild. Ætlanin skal vísa á felags tilhaldspláss, grøn øki, spælipláss og møguligar felagsbygningar. Kommunan kann krevja, at tað í ætlanini verða ásettar byggilinjur — m.a. fyri at varðveita møguligt útsýni í framtíðini. Við møguligari sundurbýting og sølu skal upprunaligi eigarin tryggja, at eisini komandi eigarar eru løgfrøðisliga bundnir í mun til felags hentleikar og øki. Hetta verður ein treyt frá kommununi í samband við góðkenning av umsókn um sundurbýti.
6. Gøtur: Ein gøtuskipan skal gerast, sum verður lagað eftir almennu gøtuskipanini. Hetta skal tryggja, at búfólk hava atgongd til tey økini har um vegir, og at almenningurin eisini kann ganga ótarnaður gjøgnum økið undir ábyrgd.
7. Byggilistarlig sniðgeving: Húsini skulu byggilistarligat, viðvíkjandi tilfari og litavali, falla væl inn í økið. Byggimyndugleikin kann áleggja byggiharranum at gera broytingar í verkætlanini, viðvíkjandi estetisku útsjóndini.

§ 37a: Undirøki L1: Øki til frítíðarhús – náttúra

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting, er, at tryggja, at byggingin í frítíðarhúsøkjum fellur væl inn í tey náttúrligu umhvørvini og varðveitir dám økisins sum náttúruøki.
2. Byggistig: Samlaða byggistigið fyri økið sum heild, má í mesta lagi vera 0,11. Um økið verður býtt sundur í smærri grundstykkir, skulu felagsøki og fríøki viga upp ímóti byggingini, soleiðis at samlaða byggistigið ikki fer upp um 0,11.
3. Bygging og útbreiðsla: Byggingin skal vera spjadd og harmoniskt lagað til landslagið. Tað mugu ikki setast upp girðingar ella innhegnaðir urtagarðar, og byggingin skal staðsetast soleiðis, at dámur økisins sum náttúruøki verður varðveittur.
4. Byggiregulerandi ásetingar Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna, mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildið við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.
5. Gróðurseting: Í minsta lagi 25% av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og/ella runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum náttúruøki.

6. Parkering: Parkering við húsini er ikki loyvd. Felags parkeringspláss skulu gerast, har búfólk og vitjandi kunnu parkera síni akfør. Tað kann tó vera møguligt at koyra nærri at húsunum í sambandi við tøming ella fylling av akfari, arbeiðsørindi og bjarging. Tað er loyvt at gera felags parkeringskjallara undir jørð, um lendið omaná verður endurskapað soleiðis, at tað fellur væl inn í heildina.

§ 37b: Undirsøki L2: Øki til frítíðarhús – býlingur

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting, er at tryggja, at bygging í bygdaøkjum fellur væl inn í tey umhvørvini og varðveitir dám økisins sum eitt vanligt føroyskt, tættari bygdarumhvørvi.
2. Byggistig: Samlaða byggistigið fyri økið má í mesta lagi vera 0,3. Um økið verður sundurbýtt í smærri grundstykkir, skulu felagsøki og fríøki viga upp ímóti byggingini, soleiðis at samlaða byggistigið ikki fer upp um 0,3.
3. Bygging og Útbreiðsla: Byggingin skal vera tættari og samfallandi integrerað í umhvørvið. Tað er loyvt at gera smáar urtagarðar við rimagarði ella steingørðum rundan um, men sjálvi húsini kunnu í mesta lagi hava tvær síður, sum liggja innan fyri rimagarði ella garði, og byggingin skal staðsetast soleiðis, at dámur økisins sum býlingur, verður varðveittur.
4. Byggiskipandi ásetingar Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.
5. Gróðurseting: Í minsta lagi 15% av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og/ella runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum bygd.
6. Parkering: Parkering við húsini er loyvd, men skal vera skipað soleiðis, at tað ikki órógvar bygdarumhvørvið. Felags parkeringspláss skulu eisini gerast, har búfólk og gestir kunnu parkera síni akfør. Tað kann vera møguligt at koyra nærri at húsunum í sambandi við tøming ella fylling av akfari, arbeiðsørindi og bjarging. Tað er loyvt at gera felags parkeringskjallara undir jørð, um lendið omaná verður endurskapað soleiðis, at tað fellur væl inn í heildina.

§ 37c: Undirøki L3: Øki til frítíðarhús – urtagarður

1. Endamál: Endamálið við hesi økisáseting er at skapa eitt øki til frítíðarhús, har hvør eigari hevur ein sjálvstøðugan grund við møguleika fyri urtagarði.
2. Byggistig: Byggistigið fyri grundøkini kann í mesta lagi vera 0,25. Vegir og felagsøki kunnu ikki teljast við í byggistigið.
3. Bygging og útbreiðsla: Frítíðarhúsini skulu vera fríttliggjandi, og skulu byggjast á egið grundstykki, sum í minsta lagi skal hava eina stødd á 500 m^2, og gjarna størri.
4. Byggiskipandi ásetingar Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við innrættaðum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 7 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Kjallaraloftið má tó ikki vera meira enn 60 cm omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.
5. Gróðurseting: Í minsta lagi 5 % av fríøkjum og felagsøkjum skulu gróðursetast við trøum og runnum á ein náttúrligan hátt, sum stuðlar undir dám økisins sum bygd.
6. Parkering: Parkering skal skipast á egnum grundstykki. Felags parkeringsøki skulu skipast fyri gestir.

§ 37d: Undirøki L4: húsvognar, kampingsmáttur og tjalding

1. Endamál: Økið er lagt av til kampingpláss. Talan kann vera um øki til húsvognar, kampingsmáttur og /ella tjalding.
2. Tá ið kampingpláss verða gjørd, útbygd ella munandi broytt, skal ein heildarætlan fyri innrætting og rakstur plássins verða útarbeidd. Heildarætlanin skal leggjast fyri kommununa til góðkenningar, sum liður í málsviðgerðini.
3. Heildarætlanin skal vísa, at innrættingin av kampingplássinum lýkur krøv til trygd, reinføri og virkni. Hon skal í minsta lagi fevna um:
   - Plássskipan og rúmd, undir hesum tal, stødd og frástøðu millum eindir, umframt møguligt býti í øki við brunabeltum.
   - Brandtrygd, undir hesum frástøðukrøv millum eindir, staðseting av sløkkiútbúnaði, atgongd fyri bjargingartól og reglur fyri opnan eld, grilling og líknandi virksemi.
   - Tøknilig skipan, undir hesum elveiting, vatn- og spillivatnsskipan, gassveiting og viðgerð av eldfimum evnum.
   - Felags hølir og bygningar, so sum reinførisbygningar, móttøku-, køks- og felagshølir, sum skulu byggjast og innrættast sambært galdandi byggilóg og brunatøkniligum ásetingum.
   - Rusk- og umhvørvisviðurskifti, undir hesum skipan av ruskstøðum, innsavnan og burturbeining av endurnýtiligum og vandamiklum tilfari, og hóskandi frástøðu til uppihaldsøki.
   - Uppihaldsøkir, herundir spæliplass, leikvøllir og grønar lundir, sum skulu tryggja góð og trygg viðurskifti fyri gestirnar.
4. Allir bygningar, varandi konstruktiónir og innrættingar, sum eru partar av heildarætlanini fyri tjaldingarplássið, eru fevndir av byggilógini og krevja byggiloyvi. Umsókn um byggiloyvi skal sendast kommununi, áðrenn arbeiðið verður sett í gongd.
5. Kommunan kann seta treytir fyri góðkenning av heildarætlanini, fyri at tryggja nøktandi brandfyribyrging, umhvørvisvernd, heilsu og skipaði viðurskifti fyri gestir tjaldingarplássins.

Uppskot til broytingar í plankortinum:

Nýggjar økisásetingar	Matr. nr.

§ 37a: Undirøki L1: Øki til frítíðarhús – náttúra	Nýtt øki: 18-45a (21.202 m² í trøðni av Ranghaga, n-vert m) Verandi øki: 18-49a (uml. 3200 m²) 18-49b (uml. 7104 m²) 18-49e (uml. 3202 m²) 18-56a (uml. 8208 m²) 18-56c (2.381 m²) 18-57a (2.373 m²)
§ 37b: Undirsøki L2: Øki til frítíðarhús – býlingur	Verandi øki: Samlað øki í Tjaldavík uml. 4390 m²: 17-68c, 17-68d, 17-68e, 17-68f, 17-68h, 17-68i, 17-68k, 17-68g og 17-68b
§ 37c: Undirøki L3: Øki til frítíðarhús – urtagarður	Einki í løtuni
§ 37d: Undirøki L4: húsvognar, kampingsmáttur og tjalding	Verandi øki: 17-96 (uml. 37366 m² - slætt øki við Hovstunnilin)

Tekniska nevnd 14. september 2026:
Nevndin tekur undir við tilmælinum. Einmælt samtykt.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Borgarstjórin mælir til at Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd um at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri § 37, øki L til frítíðarhús, húsvognar og tjalding, sambært fyriliggjandi uppskoti. Broytingin hevur til endamáls at skapa eitt greiðari og meira hóskandi grundarlag fyri menning av frítíðar- og ferðavinnuøkjum, samstundis sum atlit verða tikin til náttúru, umhvørvi, atkomu, infrakervi og eina skipaða heildarmenning av økjunum.

Einmælt samtykt tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

Býráðið 01. oktober 2026:

Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini um at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri § 37, øki L – frítíðarhús, húsvognar og tjalding, sambært fyriliggjandi uppskoti. Broytingin hevur til endamáls at skapa eitt greiðari og meira hóskandi grundarlag fyri menning av frítíðar- og ferðavinnuøkjum, samstundis sum atlit verða tikin til náttúru, umhvørvi, atkomu, infrakervi og eina skipaða heildarmenning av økjunum. Uppskotið verður síðani viðgjørt víðari sambært galdandi reglum.

Einmælt samtykt.

73/26
26/00323-2 Uppskot til broyting av byggisamtyktini - Havnarøkið og Vinnuøki (2026)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska nevnd	14.09.2026	40/26
2 Fíggjarnevndin	23.09.2026	101/26
3 Býráðið	01.10.2026	73/26

Málslýsing:

Uppskot til broyting av ásetingunum í byggisamtyktini og í plankortinum.
Eitt nýtt møguligt framtíðar uppfylt sjóøki uppá uml. 79.500 m2 verður lagt afturat í Øravíkarlíð.

Samstundis verður gjørt uppskot til nýggjar ásetingar í byggisamtyktini, at har verður upprættað eitt ásetingarøki ið eitur "Havnar- og vinnuøki", og sum ger tað møguligt eisini at byggja vinnubygningar á økinum, sum ikki hevur beinleiðis hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu.

Ætlanin er herumframt, at øll øki á sunnara síðu av Trongisvágsfirði, sum nú eru lagd út til Havnarøki "D", verða umfatað av nýggja økinum "D & C".

Ein týðandi orsøk til uppskotið er ætlaða verkætlanin Suðuroyartunnilin. Í sambandi við eina slíka stóra verkætlan kann væntast, at tørvur verður á økjum til grót og annað tilfar frá tunnilsgerðini. Við at leggja uml. 79.500 m² av sjóøki út sum havnar- og vinnuøki verður møguligt at gagnnýta gróttilfar til útfylling og samstundis skapa eitt stórt, samanhangandi øki, sum kann fáa varandi virði fyri kommununa.

Uppskotið skal tó ikki síggjast sum ein ætlan bert knýtt at tunnilsgerðini. Endamálið er samstundis at skapa karmar fyri framtíðar menning av økinum í Øravíkarlíð og á Krambatanga. Tá Suðuroyartunnilin einaferð er liðugur og tikin í nýtslu, kann væntast, at tørvurin á verandi ferjuhavn á Krambatanga broytist munandi. Tað er tí hóskandi longu nú at skapa ein rúmligan og smidligan planleggingarkarm fyri framtíðarnýtsluna av økinum.

At økið verður lagt út sum havnar- og vinnuøki merkir ikki, at økið einans er ætlað traditionellum framleiðsluvinnum ella tungum ídnaði. Ásetingarnar geva møguleika fyri einari breiðari vinnuligari menning, sum m.a. kann fevna um tænastuvinnu, ferðavinnu og aðrar vinnur, umframt virksemi við tilknýti til havn og sjógv. Hetta kann vera serliga viðkomandi í økinum kring SALT, har vinnulig, mentanarlig og ferðavinnulig menning kann hugsast í einum størri samanhangi.

Nýggja økisásetingin gevur eisini møguleika fyri bátahavnum og øðrum havnatengdum virksemi. Harvið verða framtíðar møguleikarnir ikki avmarkaðir til eina ávísa nýtslu, men økið kann mennast stigvíst eftir tørvi og teimum møguleikum, sum taka seg upp.

Mælt verður til, at ein heildarætlan (masterplan) seinni verður gjørd fyri økið. Ein slík ætlan kann áseta nærri, hvussu ymisku partarnir av økinum skulu nýtast og skipast, og tryggja, at framtíðar menning tekur hóskandi atlit at m.a. mentan, náttúru, landslagi, ferðslu og rekreativum møguleikum.


Við broytingini verður sostatt fyrst og fremst skaptur ein langsiktaður og fleksibul planleggingarkarmur, sum ger tað møguligt at gagnnýta eitt møguligt stórt rúmdartilfar frá framtíðar tunnilsgerð og samstundis gevur kommununi fleiri møguleikar fyri vinnuligari, havnaligari og aðrari menning av økinum.

Uppskotið til ásetingar er soljóðandi:

Øki D & C: Havnar- og vinnuøki

1. Økið verður lagt av til vinnu- og havnaendamál. Loyvt er at hava vinnuvirkir, t.e. heilsølur, goymslur, verkstaðir og ídnað, herundir aling, umframt tænastuvirksemi í sambandi við vinnuvirkir, parkeringsøki o.t. Eisini er loyvt at hava havnavirksemi, herundir bátahavnir, og virkir og annað virksemi, sum hevur samband við skipaferðslu, fiskivinnu og havnavirksemi annars. Byggimyndugleikin kann geva loyvi til at innrætta eina íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.
2. Grundstykki skulu vera minst 700 m² til støddar. Í bygdum øki kann byggimyndugleikin tó geva loyvi til frávik í støddini.
3. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.
4. Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 3 m³ fyri hvønn m² av grundstykkinum.
5. Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Bygging, sum fer upp um 11,5 m, skal altíð leggjast til almenna hoyring.
6. Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.
7. Neystabygging verður ikki loyvd á økinum, og loyvt verður ikki at útbyggja verandi neyst. Verður eitt neyst tikið niður, verður ikki givið loyvi til at byggja tað uppaftur.
8. Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri økið, sum á plankortinum er lagt av sum havnar- og vinnuøki.
9. Landøki, sum verður til við útfylling sambært stk. 8, kann nýtast til øll tey endamál, sum eru loyvd innan havnar- og vinnuøkið, og kann byggjast eftir somu ásetingum sum økið annars.

Uppskot til broyting av plankortinum:



Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025

Fíggjarligar avleiðingar:
Eru ikki greinaðar enn – men har verða avleiðingar.

Tilmælið:
Mælt verður til, at Tekniska nevnd tekur undir við uppskotinum um at broyta byggisamtyktina og plankortið soleiðis, at uml. 79.500 m² av sjóøki í Øravíkarlíð verður lagt út sum havnar- og vinnuøki, og at verandi havnarøki á sunnaru síðu av Trongisvágsfirði somuleiðis verður broytt til havnar- og vinnuøki.

Mælt verður somuleiðis til, at uppskotið verður lagt fyri býráðið til góðkenningar og síðani verður viðgjørt víðari sambært galdandi reglum

Tekniska nevnd 14. september 2026:
Nevndin tekur undir við, at ásetingarnar verða broyttar til øki D&C, og at útfylling kann gerast í fjøruni á avmerkta økinum millum Drelnes og Krambatanga. Nevndin vil tó viðmerkja, at økið vestanfyri havnaøkið á Drelnesi eigur at endurskoðast sum vinnu- og havnaøki. Byggisamtyktin loyvir vinnuligum- og havnavirksemi tætt uppat økjum við stórum náttúruvirði, sum ikki mugu fara fyri skeyti. Fjøran frá Drelnesi og líka vestur til ósan hevur stórt rekreativt virði fyri borgarar á staðnum. Einmælt samtykt.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Borgarstjórin mælir til at Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd um at broyta byggisamtyktina og plankortið, soleiðis at uml. 79.500 m² av sjóøki í Øravíkarlíð verður lagt út sum havnar- og vinnuøki D & C, og at verandi havnarøki á sunnaru síðu av Trongisvágsfirði somuleiðis verður broytt til havnar- og vinnuøki. Samstundis verður tikið undir við viðmerkingini hjá Teknisku nevnd um, at økið vestanfyri havnaøkið á Drelnesi eigur at endurskoðast við serligum atliti at náttúru- og rekreativu virðunum á økinum.
Einmælt samtykt.

Býráðið 01. oktober 2026:
Borgarstjórin mælir til, at býráðið tekur undir við at broyta byggisamtyktina og plankortið soleiðis, at 79.464,67 m² av sjóøki í Øravíkarlíð, saman við verandi havnarøki á sunnaru síðu av Trongisvágsfirði millum Drelnes og Krambatanga, verður lagt út sum havnar- og vinnuøki D & C, samsvarandi fyriliggjandi plankortið.
Einmælt samtykt

Til kunningar

16/26
26/00001-1 Kunning um skattainntøkur 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	23.01.2026	2/26
2 Býráðið	29.01.2026	1/26
3 Fíggjarnevndin	19.02.2026	3/26
4 Býráðið	27.02.2026	2/26
5 Fíggjarnevndin	10.03.2026	4/26
6 Býráðið	27.03.2026	3/26
7 Býráðið	05.05.2026	7/26
8 Býráðið	04.06.2026	13/26
9 Fíggjarnevndin	23.09.2026	10/26
10 Býráðið	01.10.2026	16/26

Málslýsing: Kommunustjórin 06.01.2026

skattaintøkur (kunning)

Endamál: At kunna býráðið um gongdina í skattaintøkum hjá kommununi higartil í ár, sum kann samanberast við fíggjarætlan, og meta stutt um væntaðu gongdina fyri restina av árinum.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og støðutakan.

Fíggjarnevndin 23. januar 2026:
Málið vart umrøtt og kunnað

Býráðið 29. januar 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Fíggjarnevndin 19. februar 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Býráðið 26. februar 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Fíggjarnevndin 10. marts 2026:
Málið var umrøtt og kunnað

Býráðið 27. mars 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Býráðið 05. mai 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Býráðið 04. juni 2026:
Málið var umrøtt og kunnað.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Málið varð umrøtt og kunnað.

Býráðið 01. oktober 2026:
Málið varð umrøtt og kunnað

17/26

25/00212-2 GIGNI -áheitan um at fáa skipanina við heilsufrøðingi í Tvøroyrar skula at virka samsv. áseting.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Sosiala nevnd	21.05.2025	19/25
2 Sosiala nevnd	18.06.2025	27/25
3 Fíggjarnevndin	19.06.2025	67/25
4 Býráðið	26.06.2025	48/25
5 Sosiala nevnd	21.09.2026	7/26
6 Fíggjarnevndin	23.09.2026	8/26
7 Býráðið	01.10.2026	17/26

Málslýsing: Kommunustjórin 21.05.2025
Skúlastýrið hevur sent skriv til umsitingina, við áheitan um at senda skriv til GIGNI:

Vegna skúlastýrið í Tvøroyrar skúla og Tvøroyrar kommunu, velja vit enn einaferð at koma við einari inniligari áheitan til tykkum, um at betra um viðurskiftini hjá okkara skúlanæminum samsv. fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

Sosiala nevnd 21. maj 2025:
Einmælt samtykt at senda skriv, ið er orða av skúlastýrinum til GIGNI við avrit til Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið addresera til landstýriskvinnuna. Avsendari av skrivinum verður Tvøroyrar Skúli, Skúlastýrið og Tvøroyrar kommuna.

Kommunustjórin 12. juni 2026

Umsitingin hevur sent skriv til Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið addresera til landstýriskvinnuna, og hevur GIGNI og stjórin á Heilsutrygd svara við fráboðan um, at tey ynskja fund við kommununa at umrøða støðuna.

Kommunustjórin 16.06.2025:
Fundur varð í dag við GIGNA og Heilsutrygd, og er fundarfrág. 25/00212-8 viðløgd málinum.

Sosiala nevnd 18. juni 2025:
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. juni við GIGNI og Heilsutrygd bleiv tikin til eftirtektar.

Fíggjarnevndin 19. juni 2025:
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. Juni við GIGNI og Heilsutrygd verður til eftirtektar.

Býráðið 26. juni 2025:
Málið var umrøtt og kunnað, og fundarfrágreiðingin frá fundinum 16. Juni við GIGNI og Heilsutrygd verður til eftirtektar.

Kommunustjórin 17. aug. 2026:
Fráboðan er móttikin frá GIGNI um at at Annika Magnussen heldur fram sum sjúkrarøktarfrøðingur fyri Gigni, í Vágs og Tvøroyrar skúla, skúlaárini 2026/2027 og 2027/2028.
Gigni hevur fingið despensatión frá Sundhedsstyrelsen fyri 2 ár. Hetta sum eitt undantak fyri at fáa støðufesti á skúlunum.

Sosiala nevnd 21. september 2026:
Málið var kunnað og tikið til eftirtektar.

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Málið var kunnað, og tikið til eftirtektar.

Býráðið 01. oktober 2026:
Málið var kunnað.

18/26
26/00073-2 BHS -uppskot til strategi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Sosiala nevnd	11.02.2026	9/26
2 Fíggjarnevndin	19.02.2026	21/26
3 Býráðið	27.02.2026	15/26
4 Sosiala nevnd	22.04.2026	13/26
5 Fíggjarnevndin	27.04.2026	61/26
6 Býráðið	05.05.2026	35/26
7 Sosiala nevnd	21.09.2026	18/26
8 Býráðið	01.10.2026	18/26

Málslýsing: Kommunustjórin 10.02.2026
Umsitingin hevur móttikið ávegis uppskot til strategi fyri BHS saman við viðheftum framløgum og talvum. Endamálið við hoyringini er at fáa fakligar viðmerkingar til innihaldið og møgulig ávirkan á tænastur/ábyrgdarøki hjá kommununi.

Viðheft skjøl

- Ávegis uppskot til strategi (BHS2035)
- Framløga – eldradeplar
    - Talvur – fíggjarpartur (viðv. strategi/eldradeplum)

Sosiala deild/kommunustýrið verður biðin um at:

- meta um uppskotið út frá sosialum, røktar- og eldraøkinum,
- peika á møguligar avleiðingar, møguleikar, váðar og ressurstørv (t.d. starvsfólk, førleikakrøv, tænastustig, samstarv og fígging), og
- koma við ítøkiligum rættingum/viðmerkingum til orðingar og málsetingar, um neyðugt.

Frágreiðing

Viðmerkingar/hoyringarsvar skulu avgreiðast **í seinasta lagi 13. februar 2026**, soleiðis at tær kunnu takast við í samlaðu viðgerðini.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 192 frá 4. desember 2025

Fíggjarligar avleiðingar:
Ókent

Tilmælið:
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

Sosiala nevnd 11. februar 2026:
Strategi ætlanin fyri BHS var umrøtt og kunnað. Sosiala nevnd tekur einmælt undir við fyriliggjandi ætlanini, og fegnast ma. um tilmælið at byggja nýggjan eldradepil á Tvøroyri.

Fíggjarnevndin 19. februar 2026:
Borgarstjórin mælir til at taka undir við fyriliggjandi strategi ætlanini fyri BHS, eins og sosiala nevnd, við tilmælið um, at umsitingin kannar møguligar staðseting á Tvøroyri, at byggja ein eldradepil á Tvøroyri, sum eftirfylgjandi verður lagt fyri stýrið í BHS. -Einmælt samtykt. -Málið verður lagt fyri býráðið.

Býráðið 26. februar 2026:
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi strategiætlanini fyri BHS, soleiðis sum sosiala nevnd og fíggjarnevndin eisini mæla til, við tí tilmæli, at umsitingin fær heimild til at kanna møguliga staðseting á Tvøroyri, har ein eldradepil kann byggjast. Málið verður síðani lagt fyri býráðið umvegis sosialu nevnd, áðrenn hetta verður lagt fyri stýrið í BHS. -Einmælt samtykt

Kommunustjórin 12. apríl 2026:
Málslýsing: Strategi BHS2035 – støðutakan hjá sosialu nevnd
Kommunan hevur nú fingið til viðmerkingar og støðutakan til endaligu strategiætlanina *BHS2035 – Eldraøkið í framtíðini*, sum er samtykt av stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy. Strategiin leggur upp til eina heildarætlan fyri menning av eldraøkinum fram ímóti 2035, við denti á haldføra, góða og virðiliga eldratænastu, har borgarin er í miðdeplinum.

Í ætlanini verður serliga víst á, at eldraøkið í Suðuroy stendur yvir fyri stórum avbjóðingum, eitt nú vaksandi tali av eldri borgarum, trot á hóskandi bústaðarloysnum, starvsfólkatroti, ójøvnum tænastustigi og stórum fíggjarligum trýsti. Samstundis verður mælt til, at arbeiðið frameftir verður skipað um sjey átaksøki, harímillum fyribyrging og endurmenning, hóskandi bústaðir, "heima sum longst", faklig dygd og nærvera, og leiðsla, samskifti og samstarv.

Ein týðandi partur av strategiini er tilmælið um at skipa eldraøkið í Suðuroy við tveimum eldradeplum, har annar depilin verður í norðaru helvt av oynni, og har nýggjur depil verður skotin upp at byggja á Tvøroyri. Sambært strategiini skal ein slíkur depil fevna um nútímans røktarheim, eldravinaligar íbúðir, dagtilhald, venjingar- og felagshølir og aðrar felags tænastur, ið kunnu stuðla undir bæði betri tænastur og meiri skynsaman rakstur.

Málið verður lagt fyri sosialunevnd við tí endamáli, at nevndin tekur støðu til, um Tvøroyrar kommuna kann taka undir við høvuðskósini í endaligu strategiætlan fyri BHS2035, herundir serliga:

- at arbeiða miðvíst við fyribyrging, endurmenning og tænastum, ið gera tað møguligt hjá borgarum at vera heima sum longst,
- at styrkja arbeiðið við hóskandi bústaðar- og deplaloysnum fyri eldri borgarar,
- og at taka undir við, at nærri kanningar verða gjørdar av møguligari staðseting og karmum fyri nýggjan eldradepil á Tvøroyri. ***-Hetta er longi samtykt av Tvøroyrar býráð 26. feb. 2026.***

Málið hevur týdning fyri kommununa bæði tænastuliga, sosialt og strategiskt, tí framtíðar menningin á eldraøkinum fer at hava beinleiðis ávirkan á tænastustig, samstarv, starvsfólkatørv og kommunala

langtíðarætlan. Sambært framlagda málinum hevur sosiala nevndin áður umrøtt ætlanina og tikið undir við henni, eins og mælt varð til at arbeiða víðari við kanning av møguligari staðseting fyri eldradepli á Tvøroyri.

Tilmæli:

Sosiala nevnd verður biðin um at taka støðu til, um nevndin kann taka undir við strategiætlanini BHS2035, *-ið var løgd fram á almennum fundi í miðnámsskúlanum 8. Apríl-,* sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy, og um umsitingin skal fáa heimild til at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri.

Sosiala nevnd 22. apríl 2026:

Sosiala nevnd tekur einmælt undir við strategiætlanini BHS2035, sum varð løgd fram á almennum fundi í Miðnámsskúlanum 8. apríl, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy. Somuleiðis tekur sosiala nevnd einmælt undir við at heita á umsitingina um at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri og at leggja málið fyri Tvøroyrar býráð umvegis sosialu nevnd.

Fíggjarnevndin 27. apríl 2026:

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við strategiætlanini BHS2035, sum varð løgd fram á almennum fundi í Miðnámsskúlanum 8. apríl, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy. Somuleiðis tekur fíggjarnevndin einmælt undir við at heita á umsitingina um at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri og at leggja málið fyri Tvøroyrar býráð.

Býráðið 05. mai 2026:

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við strategiætlanini BHS2035, sum yvirskipaðari kós fyri menning av eldraøkinum í Suðuroy, samsvarandi tilmælinum frá sosialu nevnd og fíggjarnevndini. Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild til at arbeiða víðari við at kanna møguligar staðsetingar og karmar fyri einum nýggjum eldradepli á Tvøroyri, og at málið verður lagt fyri býráðið aftur, tá nærri kanningar eru gjørdar.

Einmælt samtykt.

Kommunustjórin 17.09.2026:

Forkvinnan í Sosialu nevnd hevur ynskt, at nevndin fær kunning um arbeiðið og ætlanirnar hjá Bú- og Heimatænastuni. Avtala er at, Eyð Eidesgaard, kommunustýrislimur og limur í Sosialu nevnd, -sum er annað umboð hjá Tvøroyrar kommunu í BHS-, kunnar um virksemið, arbeiðið og tær ætlanir, sum eru fyri framman.

Sosiala nevnd 21. september 2026:

Eyð Eidesgaard greiddi frá starategiætlanini fyri BHS og gava eina støðulýsing d.d. -Kunningin verður eisini givin á komandi býráðsfundi.

Býráðið 01. oktober 2026:

Málið var umrøtt og kunnað -og frágreiðingin frá Eyð Eidesgaard tikin til eftirtektar.

19/26

26/00324-2 Barnatannrøktin støðulýsing um avloysarastarvið í barnatannrøktini – 14. september 2026

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Sosiala nevnd	21.09.2026	8/26
2 Fíggjarnevndin	23.09.2026	9/26
3 Býráðið	01.10.2026	19/26

Málslýsing: Kommunustjórin 14.09.2026
Støðulýsing um avloysarastarvið í barnatannrøktini – 14. september 2026

Sosiala nevnd 21. september 2026:
Málið var umrøtt og kunnað

Fíggjarnevndin 23. september 2026:
Málið var kunnað, og tikið til eftirtektar.

Býráðið 01. oktober 2026:
Kunnað var um, at Tvøroyrar kommuna hevur gjørt avtalu við Annika Næs Johannesen um at hon avloysir Annu Mikkjalsdóttir sum tannlækni í barna- og ungdómstannrøktini, nú Anna er farin í barnsburðafarloyvið í eitt ár frá 1. oktober 2026.

Fundurin lokin kl. 18:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Jens Rói Sørensen